LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

# Ársfrágreiðingin

## 2022



LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

*Løgtingsins umboðsmaður*
**Ársfrágreiðingin 2022**
© 2022 Løgtingsins umboðsmaður
Umbróting, prent og innbinding: Prentstovan.fo
Myndir: Miriam & Janus Photography, Faroephoto

ISBN 978-99918-891-1-5

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 5041 0826

# Innihaldsyvirlit


*1)* Um embætið ........ **8**

*2)* Gongdin í 2022 ........ **11**

*3)* Broyting í hagtølunum ........ **14**

*4)* Umboðsmaðurin nýggja heimasíðu ........ **15**

*5)* Hagtøl ........ **19**

*6)* Álit ........ **33**

*7)* Frágreiðingar ........ **43**

*8)* Avvístar klagur ........ **55**

*9)* Onnur viðgerð og hjálp til borgarar ........ **66**

*10)* Grein: Starvssetan innan fyri tað almenna ..... **70**

*11)* Skjøl: ........ **79**

*1.* Løgtingslóg um Løgtingsins umboðsmann ........ 77

*2.* Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann ........ **83**

*3.* Yvirlit yvir endaliga viðgjørdar klagur og frágreiðingar í 2022 ........ **86**



# Til Løgtingið

Vísandi til § 11, stk. 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann lati eg av hondum hesa frágreiðing um virksemi mítt í 2022.

Ársfrágreiðingin skal sambært nevndu grein verða almannakunngjørd áðrenn 1. juli 2023.

Tórshavn, mars 2023



*Hanna Vang*
*Løgtingsins umboðsmaður*

# 1 Um embætið



Sambært § 1 í løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann velur Løgtingið fyri eitt 5 - ára skeið ein uttantingsmann at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins. Tann 9. oktober 2020 legði løgtingsformaðurin uppskot fyri Løgtingið at velja meg til løgtingsins umboðsmann fyri eitt 5 ára skeið frá 1. januar 2021. Eg tók við embætinum 1. apríl 2021. Umframt meg sjálva er embætið mannað við løgfrøðiligu ráðgevum mínum Elinborg Apol, Gurið Joensen og Heina Petersen og skrivstovufulltrúa Fríðu S. Berg.

Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins, sum annars í sínum starvi er óheftur av Løgtinginum (§ 3).

Virksemi umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins, t.e. bæði landsins og ta kommunalu (§ 4, stk. 1). Eisini feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, eru fevndir av virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 2). Harumframt eru interkommunalir felagsskapir undirlagdir

virksemi umboðsmansins (§ 4, stk. 4). Harafturímóti fevnir virksemi hansara ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum (§ 4, stk. 5).

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara, ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti borgaranum (§ 5).

Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir, sum eru fevndar av virksemi hansara (§ 6, stk. 1).

Klagarin skal navngeva seg í klaguni, og skal hon vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað (§ 6, stk. 2).

Er talan um avgerðir, sum kunnu leggjast fyri hægri umsitingarmyndugleika, skal hesin møguleiki vera royndur fyrst, áðrenn klagað verður til umboðsmannin (§ 6, stk. 3).

Eru hesar treytir loknar, tekur umboðsmaðurin støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í tí máli, ið klagað verður um (§ 6, stk. 4).

Umboðsmaðurin kann eisini sjálvur av sínum eintingum taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi (§ 6, stk. 5).

Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætisins vegna krevur at fáa fyrilagt. Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja øll tey støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum. Hann kann eisini stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum (§ 8).

Tá umboðsmaðurin er liðugur við sínar kanningar, ger hann sína niðurstøðu, og metir hann, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt, skal hann boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og/ella kommunustýri frá hesum. Hann hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum og á annan hátt gera vart við meting sína av einum máli, hann hevur kannað. Hann kann eisini mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin (§ 10). Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal hann boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum, og er talan um kommunal ella interkommunal viðurskifti, skal hann eisini boða viðkomandi kommunustýri frá (§ 12).

Lógin og ein vegleiðing um, hvussu ein kann klaga til Løgtingsins umboðsmann, eru viðheft ársfrágreiðingini sum skjøl.

Adressan er:
**Løgtingsins umboðsmaður**
undir Bryggjubakka 11
Postsmoga 2008, FO-110 Tórshavn
teldupostadressa: **lum@lum.fo**
Heimasíða: **www.lum.fo**



# 2 Gongdin í 2022

## Innkomin og avgreidd mál í 2022

Í ársfrágreiðingini eru frásagnir av ymiskum málum, sum umboðsmaðurin hevur viðgjørt í 2022. Álit, skriv og frágreiðingar liggja í síni fullu longd í savninum á heimasíðuni.

Í 2022 fekk umboðsmaðurin 91 klagur. Av hesum 91 klagunum vóru 75 endaliga avgreiddar innan 31. desember. Harumframt vóru avgreiddar 4 klagur frá undanfarnum árum. Talið av klagum er eitt sindur hægri enn í 2021.
Flestu klagurnar vóru á málsøkjunum „Almanna-, familju og heilsumál", „Børn og ung" og „Umhvørvis, byggi-/ leigumál og friðing". Býtið av málum millum málsøkir sæst í talvu 2. Eins og undanfarin ár fevnir málsøkið „Børn og ung" um øll mál viðvíkjandi børnum, eisini um málið ítøkiliga snúði seg um til dømis ein fyrisitingarligan spurning.

Av teimum 79 klagunum, sum vóru avgreiddar í 2022, endaðu 8 við niðurstøðum í antin áliti ella skrivi. 46 klagur vóru avgreiddar við aðrari viðgerð enn niðurstøðu frá umboðsmanninum, meðan 25 klagur vóru avvístar uttan viðgerð. Í 2022 vóru givnar átalur í 6 málum.

## Mál av egnum ávum

Í ársfrágreiðingini eru eisini frásagnir frá málum, sum umboðsmaðurin tók upp av egnum ávum í 2022.

Í kanningini LUM 21/01550 hevur umboðsmaðurin kannað skúlagongdina hjá einum barni, sum var umsorganaryvirtikið. Sambært grein 28 í Barnarættindasáttmálanum hava øll børn rætt til útbúgving. Kanningin var gjørd við støði í, at tá myndugleikar yvirtaka umsorganina fyri einum barni, átaka teir sær samstundis eisini ábyrgdina av, at barnið fær nøktandi undirvísing.

Í kanningini LUM 21/07682 hevur umboðsmaðurin kannað fyrisitingarligu viðgerðina av 68 matrikkulmálum hjá Umhvørvisstovuni innan journalbólkarnar marknaseting, marknaumskipan, samanlegging, sundurbýti, sundurbýti til samanlegging, umbýti og umskipan. Endamálið við kanningini var at fáa eina heildarmynd av fyrisitingarligu viðgerðini av matrikkulmálum og finna fram til møguligar skipanarligar feilir og møguligar óhepnar mannagongdir.

Í kanningini LUM 21/19719 hevur umboðsmaðurin kannað støðuna við nemingaráðum í fólkaskúlum, frískúlum og serskúla. 41 skúlar luttóku í kanningini. Kanningin var gjørd við støði í grein 12 í Barnarættindasáttmálanum, sum ásetur, at eitt barn, sum er ført fyri at orða síni egnu sjónarmið, skal tryggjast rættin til frítt at greiða frá hesum sjónarmiðum í øllum

viðurskiftum, sum hava samband við barnið. Dentur skal leggjast á barnsins sjónarmið í samsvari við aldurin á barninum, og hvussu búgvið tað er. Hesin rættur er ikki bara galdandi fyri tað einstaka barnið, men eisini fyri børn sum bólkur. Barnarættindasáttmálin setur einki niðara aldursmark fyri hesum rætti. Eitt nú skúlar eiga tí at hoyra sjónarmiðini hjá næmingum, bæði í sambandi við avgerðir mótvegis einstaka næminginum og í sambandi við avgerðir, sum ávirka bólkar av næmingum.

Frágreiðingin LUM 22/03832 er frá eftirlitsvitjanum umboðsmansins á trimum sambýlum hjá Almannaverkinum, sum eru fyri fólk við sálarsjúku. Endamálið við vitjanini á sambýlunum fyri fólk við sálarsjúku var at kanna um fólk við sálarsjúku, sum búgva á sambýlum, verða virðiliga viðfarin, og um teirra rættindi verða vird. Eisini var kannað, hvussu samstarvið millum myndugleikarnar (Psykiatriska depilin og bústovnarnar fyri fólk við sálarsjúku), sum arbeiða við fólki við sálarsjúku, virkar. Á vitjanunum legði umboðsmaðurin dent á at fáa lýst dagligdagin hjá búfólkunum, og vórðu í hesum sambandi umrødd evnini: Sambond (relatiónir), arbeiði, undirvísing og frítíð, búfólkasamanseting, heilsuviðurskifti, valdsnýtsla og onnur inntriv.

Harumframt setti umboðsmaðurin í 2022 í verk eina kanning av eftirlitsvitjanum hjá barnaverndartænastunum kring landið sambært § 16, stk. 3 í Barnaverndarlógini og tók mál upp av egnum ávum um fyrisitingarligu mannagongdina hjá Heilsumálaráðnum, tá nýtt Etiskt ráð var sett á heysti 2022. Hesi mál vóru ikki liðug við árslok.

## Fyrispurningar

Umframt móttiknar klagur fær umboðsmaðurin hvørt ár fleiri munnligar og skrivligar fyrispurningar, sum hann leggur seg eftir at svara.

Í 2022 fekk umboðsmaðurin umleið 70 slíkar fyrispurningar. Í flestu av førunum var talan um spurningar um klagumøguleikar, og hvar fólk kunnu venda sær at fáa hjálp í mun til sín trupulleika. Umboðsmaðurin vegleiðir tá vanliga um, hvørji mál kunnu klagast til umboðsmannin, og hvørji mál liggja uttanfyri arbeiðsøkið hjá umboðsmanninum. Um borgarin er misnøgdur við eina avgerð, sum kann kærast til hægri myndugleika, minnir umboðsmaðurin á, at ein treyt fyri at venda sær til umboðsmannin er, at kærumøguleikin er brúktur.

Umboðsmaðurin er ein klagu- og eftirlitsmyndugleiki, og borgarar verða tí vanliga vístir til Rættarhjálp Føroya, um teimum tørvar løgfrøðiliga ráðgeving.

Aðrir fyrispurningar til umboðsmannin, sum kunnu nevnast, eru umbønir um, at umboðsmaðurin skal kanna ávís mál ella viðurskifti, uttan at borgarin sjálvur ynskir at lata inn eina klagu. Umboðsmaðurin tekur sjálvur støðu til, um hann vil taka eitt mál til viðgerðar av egnum ávum og hevur ikki møguleika at kanna ella taka upp øll mál, sum borgarar kunna hann um. Umboðsmaðurin ger sær tó ómak at lesa tær umbønir sum koma inn og virðismetir hesa kunning.

## Greinar

Síðani 2011 hava starvsfólk hjá umboðsmanninum skrivað greinar um ymisk løgfrøðilig evni, sum kunnu vera ein vegleiðing fyri tey, ið arbeiða innan almenna fyrisiting og onnur áhugað.

Í hesi ársfrágreiðing er ein grein um setanarmál innan tað almenna, sum umrøður tey týdningarmestu viðurskiftini hjá almennum setanarmyndugleikum at hava í huga.

## Luttøka í tiltøkum:

Fyri at kunna seg um ymisk samfelagsviðurskifti og fáa betri fatan av umstøðum og avbjóðingum á ymiskum økjum hevur umboðsmaðurin verið til ymisk upplýsandi tiltøk gjøgnum árið.

Tann 27. og 28. apríl luttók umboðsmaðurin saman við einum løgfrøðiligum ráðgeva í evropiskum umboðsmannafundi í Strasbourg. Evnið fyri fundin var millum annað, hvussu rættindi hjá borgarum vera ávirkað av talgildari fyrisiting, og hvønn leiklut umboðsmenn hava í sambandi við talgilda fyrisiting. Áhugavert var at hoyra, hvussu ymisku umboðsmenninir arbeiða á økinum. Álvarsamt var eisini at hoyra, hvussu talgild fyrisiting skerjir rættindi hjá borgarum og serliga ávísum samfelagsbólkum, um ikki serligt ansni verður haft fyri at tryggja atkomu til tænastur til teir borgarar, sum ikki eru førir fyri at samskifta talgilt.

Í august 2022 luttók umboðsmaðurin saman við einum løgfrøðiligum ráðgeva á fundi millum norðurlendsku umboðsmenninar í Reykjavík við íslendska umboðsmanninum sum verti. Hesin fundur hevur verið hildin annaðhvørt ár, men hetta var fyrsti fundur eftir, at Covid19 avmarkingarnar vóru avlýstar. Á skránni vóru framløgur frá ymisku londunum, eins og góð faklig kjak um felags avbjóðingar innan ymisk øki.

Í september 2022 luttók umboðsmaðurin saman við einum løgfrøðiligum ráðgeva á norðurlendskum fundi fyri barnaumboðsmenn í Nuuk. Eisini hesin fundur hevur ikki verið hildin fysiskt í nøkur ár vegna Covid19. Framløgur vóru um støðuna og høvuðsavbjóðingarnar í hvørjum landi sær. Evnið fyri fundin var sálarheilsa hjá børnum og ungum, og framløgurnar sýndu, at øll norðurlendsku londini í ávísan mun hava avbjóðingar við sálarheilsu hjá børnum og ungum. Ymiskt er tó, hvussu londini royna at loysa trupulleikan.

Tann 27. oktober 2022 luttók umboðsmaðurin á limafundi hjá MEGD á Biskupstorgi í Klaksvík. Evnið fyri fundin var „Rættartrygd hjá borgarum, ið bera brek“. Umboðsmaðurin fekk høvi at greiða frá virksemi sínum við serligum denti á møguleikanum hjá øllum borgarum at klaga. Greitt var frá ymisku treytunum fyri klaguviðgerð eins og greitt var frá, hvat umboðsmaðurin kann gera við innkomnar klagur.

# 3 Broyting í hagtølunum

Nakrar broytingar eru gjørdar í uppsetingini av hagtølunum fyri 2022. Broytingarnar eru gjørdar, so at hagtølini og flokkingarnar í ársfrágreiðingini framyvir fylgja teimum skrásetingum, sum umboðsmaðurin hevur í journalskipanini og hagtalsskjølunum.

Høvuðsbroytingin er í bólkingini av málsøkjum í talvu 2 og 7 (áður talva 6). Í talvu 2 og 7 bólka vit framyvir klagurnar í teir bólkarnar, sum vit brúka í journalskipanini. Ein bólkur, sum hevur fylt nógv í talvu 2 og 7 (áður talvu 6), er innlit. Innlit verður framyvir bólkað sum eitt evni og verður at síggja í nýggjari talvu - talvu 3. Talva 3 verður framyvir eitt yvirlit yvir, hvørji evni klagað er um.

Nýggja hagtalsskrásetingin er gjørd við støði í tí journalskipan, sum farið var undir at brúka, tá ið Løgtingsins umboðsmaður legði um til journalskipanina Skjalhald í 2021. Onkrar av samanberingunum við undanfarin ár, verða tí ikki gjørdar fyri 3 ár hesaferð, men einans fyri tey árini, umboðsmaðurin hevur brúkt Skjalhald.




# Umboðsmaðurin nýggja heimasíðu

Í eina tíð hevur verið greitt, at heimasíðan hjá Løgtingsins umboðsmanni, sum verður nýtt til at kunna um virksemi hjá umboðsmanninum, hevði tørv á dagføringum. Í hesum sambandi hevur umboðsmaðurin valt at gera nakrar innihaldsligar broytingar og geva heimasíðuni eitt nýtt snið.

Stórar tøkniligar broytingar eru hendar síðani fyrsti Løgtingsins umboðsmaðr byrjaði sítt virksemi í 2001. Møguleikarnir at samskifta talgilt eins og atkoma til samskiftistøkni eru nógv broytt.
Hjá Løgtingsins umboðsmanni merkist hetta eitt nú á tann hátt, at nærum alt samskifti frá borgarum og myndugleikum er vorðið talgilt.




Nýggja síðan er gjørd við tí í huga, at tey sum venda sær til umboðsmannin yvirskipað kunnu býtast í tríggjar bólkar:

- tey, ið ynskja at klaga
- tey, ið ynskja at leita sær kunning og vitan
- børn, ella vaksin vegna børn, sum ynskja at klaga ella leita sær kunning

Mitt á høvuðssíðuni eru tí nú tríggjar høvuðsinngongdir til síðuna:

- Klaga
- Leita í savninum
- Barnanna umboðsmaður

Hesar høvuðsinngongdir eru ætlaðar at gera tað léttari hjá vitjandi á síðuni at finna tað tey leita eftir.

Innihaldið á nýggju síðuni er bólkað eitt sindur annaðleiðis, men er annars nærum tað sama, sum á síðuni frá 2010.



Heimasíðan hevur eins og higartil teldutalu, soleiðis at blind, sjón- og lesiveik hava møguleika at hoyra niðurstøðurnar hjá umboðsmanninum á telduni.

Áhugað kunnu senda sína klagu beinleiðis til umboðsmannin gjøgnum heimasíðuna. Eisini liggja klaguvegleiðing og oyðibløð til fulltrú, um so er at onkur ynskir at lata seg umboða av øðrum.

Stórsta broytingin við síðuni er, at allar almennar niðurstøður, kanningar, eftirlitsvitjanir, greinar og ársfrágreiðingar eru lagdar í eitt savn, har tilfarið er flokkað eftir málsøki, evni og árstali. Eisini ber til at leita í savninum við fríteksti.

Umboðsmaðurin vónar við hesum savni at gera tað lættari og meira atkomuligt hjá eitt nú lesandi, starvsfólki innan fyrisitingina og øðrum áhugaðum at finna ta vitan, tey sóknast eftir.



Skjølini í savninum eru flokkað á tann hátt, at leiting eftir einum ávísum evni vísir skjøl, har evnið antin verður nevnt ella verður viðgjørt.

Síðan um virksemið á barnaøkinum er broytt og hevur fingið sama snið, sum heimasíðan hjá umboðsmanninum. Innihaldið er sum heild tað sama sum á fyrru síðuni. Barnasíðan hevur eitt serligt oyðiblað til klagur frá børnum.

Heimasíðurnar eru at finna á ávikavist www.lum.fo og www.bum.fo
Umboðsmaðurin vónar, at nýggja heimasíðan verður nyttulig fyri borgarar, myndugleikar, lesandi og onnur.



# 5 Hagtøl



| | |
|---|---|
| Talva 1–3 | Innkomnar klagur í 2022 |
| Talva 4–7 | Klagur, sum blivu lidnar í 2022 |
| Talva 8 | Mál av egnum ávum |
| Talva 9–13 | Málsviðgerðartíðin av málum, sum blivu liðug í 2022 |
| Mynd 1–6 | Sammetingar við undanfarin ár |

# Innkomnar klagur í 2022 býttar á myndugleikar

Í 2022 komu inn 91 klagur.
Hesar klagur vóru býttar soleiðis millum ymisku myndugleikarnar:

Talva 1

| Myndugleiki | Klagur |
|---|---|
| Almannaverkið | 10 |
| Arbeiðs- og brunaeftirlitið | 2 |
| Barnaverndartænastur | 6 |
| Búnaðarstovan | 2 |
| Býarskipanarnevnd Landsins | 1 |
| Dátueftirlitið | 1 |
| Familjufyrisitingin | 1 |
| Farsóttarnevndin | 1 |
| Fiskimálaráðið | 5 |
| Føroya Kærustovnur | 1 |
| Føroya Politi | 1 |
| Heilsumálaráðið | 4 |
| Heilsutrygd | 1 |
| Kommunur | 19 |
| Landsapotekarin | 1 |
| Landssjúkrahúsið | 2 |
| Landsverk | 2 |
| Norðoya Bú- og Heimatænasta | 1 |
| Sjóvinnustýrið | 1 |
| Skráseting Føroya | 2 |
| Skúlar | 3 |
| Strandfaraskip landsins | 3 |
| Taks | 2 |
| Umhvørvis- og vinnumálaráðið | 8 |
| Umhvørvisstovan | 1 |
| Uttanríkis- og mentamálaráðið | 2 |
| VEKS | 1 |
| Vørn | 1 |
| Yrkisdepilin | 1 |
| Annað | 5 |
| **Tilsamans** | **91** |

# Innkomnar klagur í 2022 býttar á málsøki

Talva 2

| Málsøki | Tal av klagum |
|---|---|
| Almanna-, familju og heilsumál | 19 |
| Børn og ung | 16 |
| Flutningur, tele- og dátasamskifti og vegir | 4 |
| Fólkayvirlit og nøvn | 2 |
| Kommunumál | 4 |
| Lendis- og búnaðarmál, matrikul | 9 |
| Skattur og avgjøld v.m. | 3 |
| Starvsfólkamál og arbeiðsmarknaðarmál | 10 |
| Umhvørvis, byggi-/leigumál og friðing | 12 |
| Undirvísing, gransking, kirkja og mentan | 2 |
| Uttanríkis- og verjumál | 0 |
| Vinnulívs- og fiskivinnumál v.m. | 9 |
| Annað | 1 |
| **Tilsamans** | **91** |

# Innkomnar klagu í 2022 býttar á evni

Talva 3

| Evni | Tal |
|---|---|
| Avgerð | 28 |
| Vantandi avgerð | 5 |
| Atburð | 6 |
| Gegni | 4 |
| Grundgeving | 1 |
| Innlit | 7 |
| Málsviðgerðartíð | 4 |
| Notatskyldu og journalisering | 2 |
| Partshoyring | 4 |
| Tagnarskyldu og viðgerð av persónsupplýsingum | 0 |
| Útinnandi fyrisiting | 8 |
| Vantandi kunning | 1 |
| Vantandi svar | 12 |
| Vegleiðing | 1 |
| Aðrir málsviðgerðarspurningar | 8 |
| **Tilsamans** | **91** |

## Endaliga avgreiddar klagur í 2022

Av teimum 91 klagunum, sum komu inn í 2022 vóru 75 endaliga avgreiddar innan 31. desember 2022. Harumframt vóru avgreiddar 4 klagur frá undanfarnum árum. Úrslitið av viðgerðini var hetta (býtt upp eftir myndugleika):

Talva 4

| Klagur býttar á myndugleika | | Endaðar við | | |
|---|---|---|---|---|
| Myndugleiki | Klagur | Avvístar | Onnur viðgerð | Viðgjørdar við áliti ella skrivi |
| Almannaverkið | 9 | 4 | 5 | |
| Arbeiðs- og brunaeftirlitið | 1 | | 1 | |
| Barnaverndartænastur | 6 | 1 | 5 | |
| Búnaðarstovan | 2 | 1 | 1 | |
| Býarskipanarnevnd Landsins | 1 | 1 | | |
| Familjufyrisitingin | 1 | 1 | | |
| Farsóttarnevndin | 1 | 1 | | |
| Fiskimálaráðið | 5 | | 4 | 1 |
| Føroya Kærustovnur | 1 | | 1 | |
| Føroya Politi | 1 | 1 | | |
| Heilsumálaráðið | 3 | | 3 | |
| Heilsutrygd | 1 | | 1 | |
| Kommunur | 17 | 8 | 5 | 4 |
| Landsapotekarin | 1 | | 1 | |
| Landssjúkrahúsið | 2 | 1 | 1 | |
| Landsverk | 2 | 1 | | 1 |
| Norðoya Bú- og Heimatænasta | 1 | | 1 | |
| Sjóvinnustýrið | 1 | | 1 | |
| Skúlar | 2 | 1 | 1 | |
| Strandfaraskip landsins | 2 | | 2 | |
| Taks | 2 | 1 | 1 | |
| Umhvørvis- og vinnumálaráðið | 7 | 2 | 5 | |
| Umhvørvisstovan | 1 | | 1 | |
| Uttanríkis- og mentamálaráðið | 2 | | 1 | 1 |
| VEKS | 1 | | | 1 |
| Vørn | 1 | | 1 | |
| Annað | 5 | 1 | 4 | |
| **Tilsamans** | **79** | **25** | **46** | **8** |

## Viðgjørdar klagur í 2022 har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar, ella har grundarlag ikki var fyri at kanna málið

Í 2022 vóru viðgjørdar 46 klagur, har umboðsmaðurin veitti aðra viðgerð og hjálp til borgarar, ella har grundarlag ikki var fyri at kanna málið.
Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

Talva 5

| Onnur viðgerð og hjálp | Klagur |
|---|---|
| Gongd komin á málið | 3 |
| Umboðsmaðurin metti ikki grundarlag vera fyri at gera meira við | 32 |
| Klagari vístur til kærumyndugleika | 2 |
| Málið tikið uppaftur | 3 |
| Annað | 6 |
| **Tilsamans** | 46 |

## Avvístar klagur í 2022

Í 2022 vóru 25 klagur avvístar av ymiskum orsøkum.
Býtið teirra millum sæst niðanfyri:

Talva 6

| Avvísingarorsøk | Klagur |
|---|---|
| Innkomin ov seint | 3 |
| Kærumyndugleiki ikki troyttur | 17 |
| Uttanfyri heimildarøki | 5 |
| **Tilsamans** | **25** |

## Viðgjørdar klagur í 2022 býttar á málsøki

Tey málini, sum vóru endaliga viðgjørd í 2022, kunnu býtast upp eftir málsøki á hendan hátt:

Talva 7

| Málsøki | Klagur |
|---|---:|
| Almanna-, familju og heilsumál | 19 |
| Børn og ung | 14 |
| Flutningur, tele- og dátasamskifti og vegir | 3 |
| Fólkayvirlit og nøvn | 2 |
| Kommunumál | 2 |
| Lendis- og búnaðarmál, matrikul | 9 |
| Skattur og avgjøld v.m. | 3 |
| Starvsfólkamál og arbeiðsmarknaðarmál | 7 |
| Umhvørvis, byggi-/leigumál og friðing | 10 |
| Undirvísing, gransking, kirkja og mentan | 2 |
| Uttanríkis- og verjumál | 0 |
| Vinnulívs- og fiskivinnumál v.m. | 7 |
| Annað | 1 |
| **Tilsamans** | **79** |

## Mál tikin upp av egnum ávum

Av teimum 3 málunum, sum umboðsmaðurin sjálvur tók upp í 2022, var 1 endaliga avgreitt innan 31. desember 2022. Harumframt vóru avgreidd 3 mál frá undanfarnum árum. Frágreiðingarnar kunnu lesast frá síðu 43

Talva 8

| Avgreiddu málini eru býtt soleiðis millum ymisku myndugleikarnar | | |
|---|---|---|
| **Byrjað** | **Heiti á máli** | **Myndugleiki** |
| 2020 | Kanning av skúlagongdini hjá umsorganaryvirtiknum barni | Fólkaskúlar |
| 2021 | Kanning av viðgerðini av matrikulmálum | Umhvørvisstovan |
| 2021 | Kanning av næmingaráðum í fólkaskúlanum | Barnaskúlarnir í Føroyum |
| 2022 | Eftirlitsvitjan í sambýlum fyri fólk við sálarsjúku | Almannaverkið |

## Málsviðgerðartíðin av klagum sum endaðu við áliti ella skrivi

Miðalviðgerðartíðin av teimum 8 endaliga viðgjørdu klagunum, har álit ella skriv var skrivað, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 9

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | 1 | mðr | 5 | dagar |
| Samlað | 4 | mðr | 6 | dagar |

## Málsviðgerðartíðin av klagum, har umboðsmaðurin hevur veitt aðra viðgerð og hjálp til borgarar

Miðalviðgerðartíðin av teimum 46 klagunum, har umboðsmaðurin veitti borgarum aðra hjálp og viðgerð, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 10

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | | 5 | dagar |
| Samlað | 1 | mðr | 5 | dagar |

# Málsviðgerðartíðin av avvístum klagum

Miðalviðgerðartíðin av teimum 25 avvístu klagunum var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 11

| Viðgerðartíð í miðal | | |
|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | 2 | dagar |
| Samlað | 23 | dagar |

# Málsviðgerðartíðin av øllum klagum

Miðalviðgerðartíðin fyri allar klagur, bæði avvístar og endaligar viðgjørdar klagur, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 12

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | | 7 | dagar |
| Samlað | 1 | mðr | 10 | dagar |

# Málsviðgerðartíðin av málum av egnum ávum:

Miðalviðgerðartíðin av teimum 4 málunum av egnum ávum, sum vóru avgreidd í 2022, var:
*(Roknað er við 30 døgum pr. mánað)*

Talva 13

| Viðgerðartíð í miðal | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Aftan á partshoyring | | | 9 | dagar |
| Samlað | 11 | mðr | 8 | dagar |

# Sammetingar 2020–2022

Mynd 1




## Avvísingarorsøk

Mynd 2



## Innkomnar klagur býttar á málsøki

Mynd 3




## Innkomnar klagur býttar á evni

Mynd 4



# Innkomnar klagur býttar á áðalráðini við undirliggjandi stovnum, kommunur, Føroya Kærustovn og mál um børn og ung

Mynd 5



# Innkomnar klagur 2001-2022

Mynd 6





# 6 Álit

## Álit og skriv

Umboðsmaðurin viðger klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum. Ein borgari kann t.d. klaga um, at ein umsókn er noktað, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og/ella framferðarháttin hjá embætisfólkum.

Um umboðsmaðurin, eftir at hava kannað málið, kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur klagaranum viðhald, kann hann finnast at tí myndugleika, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Umboðsmaðurin kann ikki sjálvur broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í summum førum er umboðsmaðurin samdur við myndugleikanum, men av tí at umboðsmaðurin metir, at evnið hevur almennan áhuga, almannakunnger umboðsmaðurin eitt skriv um niðurstøðu sína.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur avgreitt við einum áliti ella skrivi.

**MÁL NR 21/14528**

## Fuglafjarðar kommuna fekk átalu fyri handfaringina av einum byggimáli

Ein borgari vendi sær til umboðsmannin við eini klagu um, at Fuglafjarðar kommuna sýtti fyri at rætta skaða, sum hon, sambært klagaranum, hevði ábyrgd av í sambandi við útgrevstur á grannaogn klagarans.

Í klaguni varð víst á, at skaðin m.a. komst av, at kommunan ikki framdi eftirlit við byggiloyvinum á grannaognini og harvið ikki tryggjaði ogn klagarans móti skaðum.

Klagað varð eisini um, at kommunan ikki helt eina avtalu um ábøtur, sum klagarin og umsitingin vóru komin ásamt um.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at stórsti parturin av málinum snúði seg um møguligan skaða, ábyrgd og endurgjald í sambandi við útgrevstur á grannaognini. Umboðsmaðurin vísti á, at hetta vóru viðurskifti, sum vóru tengd at próvførslu, og tí ikki vóru egnað at taka støðu til í eini umboðsmansviðgerð. Umboðsmaðurin gjørdi tí ikki meira við hendan partin av málinum, men viðgjørdi bert fyrisitingarliga partin og handfaringina av málinum.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at sambært góðum fyrisitingarsiði hevði kommunan skyldu at gera notat frá einum fundi við klagaran, har avtalað var gjørd um, hvørji stig skuldu takast í málinum. Eisini helt umboðsmaðurin, at kommunan ikki hevði handfarið málið á nøktandi hátt, tá hon í langa tíð arbeiddi saman við klagaranum fyri at finna eina loysn á málinum uttan at tryggja sær fíggjarliga heimild fyri loysnini ella beinanvegin at taka fyrivarni mótvegis klagaranum um, at loysnin var treytað av fíggjarligari góðkenning frá teknisku nevnd.

Umboðsmaðurin gav Fuglafjarðar kommunu eina átalu fyri handfaringina av málinum

**MÁL NR 21/23892**

## Uttanríkis- og mentamálaráðið gav ikki nøktandi grundgeving í sambandi við setan av skúlastjóra í Vestmanna skúla

Ein borgari vendi sær til umboðsmannin við einari klagu um málsviðgerðina hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum í sambandi við, at nýggjur skúlastjóri var settur í Vestmanna skúla.

Klagarin førdi fram, at landsstýrismaðurin ikki hevði givið eina nøktandi grundgeving fyri, hví klagarin ikki var settur í starv sum skúlastjóri, hóast setanarnevndin í sínum tilmæli hevði tilnevnt hann sum nr. 1 til starvið. Klagarin klagaði eisini um, at avgerðin hjá landsstýrismanninum var tikin, uttan at málið var lýst til fulnar.

Í frágreiðing til umboðsmannin, í sambandi við klaguna, gjørdi Uttanríkis- og mentamálaráðið m.a. greitt, at tilmælið frá setanarnevndini ikki var bindandi fyri landsstýrismannin. Ráðið greiddi frá, at setanarnevndin hevði tilnevnt tríggjar umsøkjarar til starvið í talmerktari raðfesting, og at landsstýrismaðurin hevði heimild at taka avgerð um at velja ein annan av hesum umsøkjarum til starvið enn tann, ið setanarnevndin hevði tilnevnt sum nr. 1. Harafturat førdi ráðið fram, at tá talan var um eitt setanarmál, vóru krøvini til grundgeving linari enn í øðrum avgerðarmálum.

Umboðsmaðurin tók undir við Uttanríkis- og mentamálaráðnum, at tilmælið frá setanarnevndini ikki var bindandi fyri landsstýrismannin. Hóast hetta, so hevði landsstýrismaðurin sambært umboðsmanninum ikki fingið fríar ræsur at velja og vraka millum umsøkjararnar, ið vóru til starvið. Avgerðin hjá landsstýrismanninum skuldi, umframt at hava heimild í lóggávu, millum annað lúka vanlig fyrisitingarrættarlig krøv, eitt nú skylduna at grundgeva, skylduna at føra eina sakliga fyrisiting og skylduna at lýsa eitt mál, áðrenn ein avgerð varð tikin.

Umboðsmaðurin tók ikki undir við Uttanríkis- og mentamálaráðnum, at krøvini til grundgeving í hesum føri vóru linari enn í øðrum avgerðarmálum. Umboðsmaðurin metti, at grundgevingin ikki samsvaraði við almenna setanarpolitikkin hjá landsstýrinum og lýsti ikki, hví mett var, at førleikin hjá tí, ið settur var í starvið, svaraði betur til ásettu krøvini í starvslýsingini, enn førleikin hjá tí, ið ikki var settur.

Tað, at klagarin ikki bara hevði verið til setanarsamrøðu, men eisini í tilmælinum frá setanarnevndini var mettur at verða best skikkaði umsøkjari at røkja starvið sum skúlastjóri, setti, sambært umboðsmanninum, enn strangari krøv til skylduna at grundgeva.

Soleiðis sum málið var lýst, dugdi umboðsmaðurin ikki at síggja, hvat hevði verið avgerandi fyri, at avgerðin hjá landsstýrismanninum var øðrvísi enn metingin hjá setanarnevndini. Umboðsmaðurin fekk tí ikki gjørt sær eina meting av, um atlitini, ið landsstýrismaðurin hevði tikið í hesum máli, í roynd og veru vóru saklig, og um landsstýrismaðurin átti at lýst málið betri.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Uttanríkis- og mentamálaráðnum eina átalu fyri ikki at geva klagaranum eina nøktandi grundgeving í sambandi við hetta setanarmál. Samstundis heitti umboðsmaðurin á Uttanríkis- og mentamálaráðið um at geva klagaranum eina nøktandi grundgeving og lata umboðsmanninum eitt avrit av henni.

Burtursæð frá hesari átalu og viðmerkingum, gjørdi umboðsmaðurin ikki meira við málið.

**MÁL NR 22/00137**

## Fiskimálaráðið sýtti innliti í skjal við talupunktum hjá landsstýrismanninum

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um, at Fiskimálaráðið hevði sýtt honum innlit í eitt skjal við talupunktum hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum.

Klagarin helt, at Fiskimálaráðið átti at givið meirinnlit í skjalið, tí talan var um eitt meira enn 10 ára gamalt skjal, og atlit tí ikki longur var fyri, at geva fyrisitingini frið at fyrireika málið.

Fiskimálaráðið vísti á, at talan var um eitt innanhýsis skjal, sum var undantikið innliti, sbrt. § 7 í innlitslógini. Skjalið var gjørt til egna nýtslu, landsstýrismaðurin hevði havt tað við sær til eitt samráð í Vinnunevndini í Løgtinginum, og tað varð ikki latið øðrum. Fiskimálaráðið metti ikki, at skjalið var fevnt av § 8 í innlitslógini, sum veitir innlit í ávís innanhýsis skjøl.

Fiskimálaráðið metti, at innlit heldur ikki skuldi gevast í upplýsingar í skjalinum sbrt. 11, stk. 1 í innlitslógini, sokallað ekstrahering, tí skjalið hevði ikki veruligar upplýsingar av stórum týdningi fyri málið. Viðvíkjandi meirinnliti, sbrt. § 4, stk. 1 í innlitslógini, hevði ráðið vigað fyrilitið fyri, at fyrisitingin kann arbeiða í frið hægri enn áhugan hjá klagaranum at fáa innlit í skjalið. Ráðið helt tað ikki hava týdning, at 10 ár vóru farin, síðani skjalið varð framleitt. Harumframt var tað óvist, í hvønn mun landsstýrismaðurin hevði brúkt talupunktini undir samráðnum í Vinnunevndini.

Umboðsmaðurin var samdur við Fiskimálaráðið í, at talan var um eitt innanhýsis skjal, og at innlit ikki var í skjalið, hvørki eftir § 7 ella § 8 í innlitslógini.

Umboðsmaðurin minti á, at skyldan at lata innlit í veruligar upplýsingar í skjalinum, sum eru av stórum týdningi fyri málið, sbrt. § 11, stk. 1 í innlitslógini, eisini fevnir um sokallað „funktiónsfakta". Hetta eru upplýsingar, sum eru við til at styðja próvliga grundarlagið í málinum ella hava til endamáls at skapa greidleika viðvíkjandi veruligu umstøðunum í málinum.

Umboðsmaðurin helt, at stórur partur av skjalinum vóru upplýsingar, sum skylda ikki var at ekstrahera, sbrt. § 11, stk. 1 í innlitslógini. Tó kundu nøkur av talupunktunum metast at innihalda veruligar upplýsingar og sokallað „funktiónsfakta". Umboðsmaðurin tók ikki støðu til, um upplýsingarnar vóru av stórum týdningi fyri málið, ella um upplýsingarnar, í tann mun skylda var at lata innlit í tær, kundu undantakast eftir øðrum ásetingum í innlitslógini.

Umboðsmaðurin helt tað ikki vera avgerandi fyri skylduna at lata innlit í upplýsingar í skjalinum, í hvønn mun landsstýrismaðurin hevði brúkt talupunktini í skjalinum undir samráðnum í Vinnunevndini. Tað, sum var avgerandi, var eyðkennið á teimum einstøku upplýsingunum, og hvørjum samanhangi tær vóru partur av.

Umboðsmaðurin minti á, at hóast atlit kann takast at arbeiðsfriðinum hjá fyrisitingini, tá mett verður, um meirinnlit skal latast, so eigur fyrisitingin hinvegin at hava í huga, at endamálið við almennum innliti er at tryggja gjøgnumskygni í fyrisitingini. Borgarar og miðlar eiga í mest møguligan mun at kunna fylgja við og hava eftirlit við, at alt fer rætt fram, tá fyrisitingin útinnir arbeiði sítt.

Av tí at kanningarstjóri væntandi varð settur í næstum at kanna lógargrundarlagið, lógar- og reglutulkingar og fyrisitingarligar avgerðir í føroyskari fiskvinnufyrisiting viðvíkjandi tilluting av og útluting av fiskirættindum síðani 2010, var skjalið við talupunktunum hjá landsstýrismanninum møguliga fevnt av § 13, stk. 1, nr. 6 í innlitslógini og undantikið innliti í síni heild. Umboðsmaðurin helt, at ein komandi kanningarstjóri kundi mett um hetta. Umboðsmaðurin gjørdi tí ikki meira við málið.

MÁL NR 22/08550

## Runavíkar kommuna fekk eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av umsóknum um byggiloyvi til neyst

Ein borgari vendi sær í mai 2022 til umboðsmannin, tí Runavíkar kommunu ikki svaraði hansara umsókn um byggiloyvi til neyst. Klagarin hevði søkt um byggiloyvi til neyst í mars 2021, men hevði í mai 2022 enn ikki fingið svar frá Runavíkar kommunu.

Runavíkar kommuna greiddi frá, at Byggi- og býarskipanarnevndin og Vinnu- og havnarnevndin høvdu samtykt á fundi í mars 2020 at endurskoða reglurnar fyri neystabygging. Arbeiðið var ikki komið á mál, og umsóknir um byggiloyvir til neyst vórðu lagdar í bíðistøðu, til uppskotið um endurskoðan av byggisamtyktini var liðugt viðgjørt og samtykt av býráðnum. Hetta hevði Runavíkar kommuna ikki kunnað klagarin um.

Sambært Runavíkar kommunu lógu 13 umsóknir um byggiloyvi til neyst í bíðistøðu, íroknað umsóknina hjá klagaranum. 9 umsøkjarar høvdu fingið einsljóðandi móttøkuváttan, men onga kunning um bíðistøðuna og orsøkina til hana, 2 umsøkjarar høvdu hvørki fingið móttøkuváttan ella kunning um bíðistøðuna, meðan 2 umsøkjarar høvdu fingið noktandi svar vísandi til endurskoðan av byggisamtyktini. Hóast noktandi svarið stóðu umsóknirnar hjá hesum báðum eisini í bíðistøðu. 4 av umsøkjarunum høvdu, sambært skjalayvirlitinum, sent áminningar til Runavíkar kommunu, men ikki fingið svar.

Umboðsmaðurin helt hetta als ikki vera nøktandi og gav Runavíkar kommunu eina átalu fyri ikki at hava svarað og kunnað klagaran og hinar umsøkjararnar um, at umsóknir teirra vórðu settar í bíðistøðu, orsøkina til bíðistøðuna, og nær svar kundi væntast.

Tær 13 umsóknirnar høvdu, sambært skjalayvirlitinum, ligið uttan viðgerð í longri tíðarskeið, í onkrum føri síðani 2020. Umboðsmaðurin viðmerkti, at kommunan hevði skyldu at viðgera umsóknir um byggiloyvi til neyst eftir galdandi lóggávu og innan rímiliga tíð. Í sambandi við at Runavíkar kommuna hevði ætlanir um at broyta byggisamtyktina viðvíkjandi neystabygging, átti hon at farið fram eftir røttum mannagongdum. Umboðsmaðurin vísti á, at um ein kommuna hevur byggisamtykt í umbúnaði, hevur hon, sambært § 8 í býarskipanarlógini, møguleika at biðja landsstýrið um at nokta fyri nýtslu, ið verður hildin at vera ósamsvarandi ætlaðu byggisamtyktini. Runavíkar kommuna hevði ikki nýtt hesa mannagongd, tá umsóknirnar vórðu settar í bíðistøðu.

Umboðsmaðurin helt tað vera sera átaluvert, at Runavíkar kommuna hevði lagt umsóknina frá klagaranum og hinar umsóknirnar um byggiloyvi til neyst í bíðistøðu og ikki viðgjørt tær sambært galdandi lóggávu og innan rímiliga tíð.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Runavíkar kommunu eina álvarsliga átalu fyri handfaringina av umsóknunum um byggiloyvi til neyst og mælti Runavíkar kommunu til at endurskoða mannagongdir sínar í sambandi við byggimálsviðgerð.

Av tí at umboðsmaðurin helt talan vera um, at álvarslig mistøk vóru framd í hesum máli, kunnaði hon, sambært § 10, stk. 1 í umboðsmanslógini, formansskapin í Løgtinginum, løgmann og landsstýrismannin í Kommunumálum (Umhvørvis- og Vinnumálum) um málið.

**MÁL NR 22/16132**

## Dagstovnur sýtti fyri at ansa barni, sum ber brek

Ein mamma við barni, sum ber brek, klagaði til umboðsmannin um, at kommunan gjørdi mismun á børnunum í kommununi, tí barn klagarans var einasta barni á dagstovni í kommununi, sum varð sýtt ansing tveir ávísar dagar í september mánað.

Dagstovnurin hevði skipað seg soleiðis, at eitt starvsfólk (stuðul) var um barnið burturav. Stuðulin hevði sagt seg úr starvi til 1. september 2022, men hevði játtað at halda fram í ein til tveir mánaðir afturat, meðan kommunan royndi at finna nýggjan stuðul til barnið. Stuðulin kundi tó ikki byrja í nýggju setanini fyrrenn tann 6. september 2022.

Dagstovnurin var undirmannaður tann 2. og 5. september 2022, men av tí at nøkur børn høvdu frí, gekk tað upp við talið av starvsfólkum. Einki starvsfólk var sjúkt á stovuni, har ítøkiliga barnið gekk. Fyrrverandi stuðulin hjá barninum, sum hevði serligar førleikar at ansa barninum, arbeiddi á stovuni hjá barninum. Dagstovnaleiðarin kom til ta niðurstøðu, at starvsfólkaorka ikki var at veita ítøkiliga barninum ansing tann 2. og 5. september 2022, tí stuðulin hjá barninum ikki var byrjaður í nýggju setan síni enn.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at hann ikki kundi taka støðu til ítøkiligu metingina og raðfestingina hjá dagstovnaleiðaranum av, hvussu starvsfólkaorkan og arbeiðið best varð skipað á stovuni hjá ítøkiliga barninum og dagstovninum hesar báðar dagarnar, har stovnurin var raktur av sjúku og sjúkramelding.

Umboðsmaðurin helt tó, at skipanin av starvsfólkahópinum á dagstovninum hvørki var í samsvari við § 5 í Dagstovnalógini og viðmerkingunum til ásetingina ella við grein 7, stk. 2 í ST-sáttmálanum um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, tí dagstovnurin hevði skipað seg soleiðis, at bara eitt einstakt starvsfólk – stuðulin - skuldi taka ábyrgd av barninum, sum ber brek. Tilboðið um ansing av barninum var tí sera viðbreki fyri, at hetta starvsfólkið barst frá at møta til arbeiðis, hevði frí ella segði upp.

Umboðsmaðurin gav kommununi eina átalu fyri, at dagstovnurin hevði skipað seg soleiðis, at neyðugt var at sýta barninum, sum ber brek, ansing nevndu dagarnar.

Kommunan upplýsti, at dagstovnurin var í ferð við at umskipa arbeiðið, soleiðis at øll starvsfólk á stovuni hjá ítøkiliga barninum, umframt leiðslan, fingu førleikar til og kundu taka ábyrgd av ansingini av barninum. Umboðsmaðurin gjørdi tí ikki meira við málið.

MÁL NR 22/17836

## Landsverk svaraði ikki fyrispurningi um keyp av fastogn

Ein borgari vendi sær til umboðsmannin við einari klagu um, at Landsverk ikki hevði svarað fyrispurningi hansara um keyp av fastogn.

Klagarin sendi, tann 13. desember 2021, ein fyrispurning til Landsverk um at keypa ávísa fastogn, ið Landsverk eigur.

Tá Landsverk ikki svaraði hesum fyrispurningi, sendi klagarin, tann 11. august 2022, Landsverk eina áminning um fyrispurningin.

Tann 10. oktober í 2022, aftaná at klagarin hevði klagað til umboðsmannnin, sendi Landsverk umboðsmanninum avrit av svarinum, ið Landsverk sama dag hevði givið klagaranum til fyrispurning hansara. Klagarin hevði tá bíða eftir einum svari í útivið 10 mánaðir.

Í frágreiðing til umboðsmannin vísti Landsverk á, at orsøkin til drúgvu málsviðgerðartíðina var, at deildin á Landsverk, ið skuldi málsviðgera fyrispurningin, hevði eina stóra arbeiðsbyrðu og trot á arbeiðsmegi.

Umboðsmaðurin vísti á, at stór arbeiðsbyrða og vantandi arbeiðsmegi kunnu vera umberandi orsøk fyri einari óvanligari langari málsviðgerðartíð. Í slíkum førum eigur myndugleikin tó at kunna borgaran um orsøkina til íkomnu støðuna, og nær myndugleikin væntar, at málið verður avgreitt.

Umboðsmaðurin helt tað vera átaluvert, at Landsverk ikki hevði givið klagaranum slíka kunning, hóast klagarin hevði mint Landsverk á málið.

Sambært tí, ið Landsverk hevði greitt frá í málinum, helt umboðsmaðurin, at málið ikki innihelt torgreidd viðurskifti, ið kravdu eina so drúgva málsviðgerð.

Umboðsmaðurin helt eisini, at Landsverk, tá málið byrjaði, átti at gjørt eina snarkanning av málinum, fyri at fingið staðfest, hvar og hvussu málið best kundi verið loyst innanhýsis hjá Landsverk, sæð í mun til spurningin um arbeiðsbyrðu og arbeiðsmegi hjá stovninum.

Umboðsmaðurin helt ikki, at Landsverk hevði víst á nøkur viðurskifti, ið vóru saklig og umberandi orsøk fyri, at Landsverk hevði latið fyrispurningin frá klagaranum hvíla í nærum 10 mánaðir, uttan at geva klagaranum nakra kunning hesum viðvíkjandi.

Samanumtikið gav umboðsmaðurin Landsverk eina átalu fyri málsviðgerðina av hesum máli

MÁL NR 22/17872

## Málsviðgerðin hjá VEKS var ikki nøktandi

Ein borgari søkti í mai 2018 VEKS um búpláss á røktarheimi. Á visitatiónsfundi í juli 2018 metti VEKS, at borgarin ikki hevði akuttan tørv á búplássi. Nakað eftir hetta varð honum játtað umlætting. Frá á sumri 2018 til august 2022 viðgjørdi VEKS javnan støðuna hjá honum og játtaði millum annað heimahjálp og umlætting á røktarheimi. Avvarðandi spurdu í hesum tíðarskeiði fleiri ferðir, nær borgarin kundi vænta at fáa búpláss.

Borgarin og avvarðandi vendu sær til umboðsmannin við málinum. Í klaguni varð gjørt galdandi, at VEKS ikki hevði boðað frá, at umsóknin frá mai 2018 var sýtt. VEKS metti seg hinvegin at hava svarað umsóknini, og at umstøðurnar í málinum, m.a. at klagarin ístaðin hevði fingið játtað heimahjálp (v.m.) og í tíðum umlætting, vístu, at umsóknin um búpláss var sýtt. Í innanhýsis skjølunum hjá VEKS sást, at avgjørt var ikki at játta búpláss, tí mett varð, at klagarin ikki hevði akuttan tørv á búplássi, og at ætlanin var, at klagarin skuldi fáa avgerð um hetta. Tað var tó ikki skjalprógvað, at avgerðin var fráboðað klagaranum, hvørki skrivliga ella munnliga.

Umboðsmaðurin helt, at tað hevði verið góður fyrisitingarsiður, at klagarin fekk skrivliga fráboðan um, at umsóknin um búpláss var sýtt, so greidleiki var um avgerðina. Harvið hevði klagarin eisini fingið kæruvegleiðing um møguleikan at royna rættleikan í avgerðini.
Umboðsmaðurin mælti VEKS til at gera mannagongdir fyri, hvørjar av teirra avgerðum skulu fráboðast skrivliga við grundgeving og kæruvegleiðing.

Umboðsmaðurin vísti eisini á, at ein innlitsumbøn frá klagaranum og avvarðandi ikki var viðgjørd nøktandi. VEKS hevði bert givið innlit í skjøl úr eini av sínum journalskipanum, men hevði ikki viðgjørt spurningin um innlit í skjøl og upplýsingar úr øðrum skipanum, sum VEKS nýtti til skráseting av upplýsingum um klagaran. Umboðsmaðurin bað VEKS taka málið um innlit upp til nýggja viðgerð og vísti á, at innihaldið í onkrum av skrásetingarskipanunum kunnu metast sum sjúklingajournalir og skulu ikki viðgerast eftir reglunum í fyrisitingarlógini.

Samanumtikið helt umboðsmaðurin ikki málsviðgerðina hjá VEKS vera nøktandi, tí innlitsumbønin var ikki rætt viðgjørd, og skrásetingin av málinum var so ógreið, at ivi var um málsgongdina. Umboðsmaðurin gav tí VEKS eina átalu fyri handfaringina av málinum.

Umboðsmaðurin mælti harumframt VEKS til at tryggja sær, at greiðar leiðreglur eru fyri samskifti við borgarar og avvarðandi.



# 7 Frágreiðingar

Umboðsmaðurin kann taka eitt mál upp av egnum ávum og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi. Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av sínum virkisøki, og hann hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

Umboðsmaðurin kann kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varugur við viðurskifti, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin gerst varugur við viðurskifti, sum ikki beinleiðis er klagað um, men sum hann ynskir at kanna nærri.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur kannað og skrivað eina frágreiðing um.

**MÁL NR 21/01550**

## Kanning av skúlagongdini hjá umsorganaryvirtiknum barni

Sambært grein 28 í Barnarættindasáttmálanum hava børn rætt til útbúgving. Nøktandi undirvísing er grundarlagið fyri at fáa eina útbúgving og arbeiði, sum í stóran mun er atgongumerki til eina góða og innihaldsríka tilveru, har einstaklingurin verður førur fyri at uppihalda sær sjálvum.

Umboðsmaðurin kannaði skúlagongdina hjá einum barni, sum var umsorganaryvirtikið. Í sambandi við kanningina hevði umboðsmaðurin hesar viðmerkingar og tilmæli til avvarðandi myndugleikar:

### 1. Viðvíkjandi undirvísingar- og menningarætlanum

Um eitt barn er burtur frá skúla í longur enn 2 vikur vegna sjúku, smittuvanda ella vælferð, skal skúlaleiðarin, sbrt. § 1, stk. 1 og 2 í kunngerð nr. 6 frá 2. februar 2015 um heimaundirvísing og sjúkraundirvísing, sum broytt við kunngerð nr. 126 frá 12. september 2018, taka stig til, at barnið fær heimaundirvísing ella sjúkraundirvísing.

Barn, sum fær sjúkra- og heimaundirvísing, eigur, sbrt. § 3, stk. 2 og 3 í kunngerð um heimaundirvísing og sjúkraundirvísing, at fáa undirvísing eftir eini einstaklings undirvísingarætlan, sum tekur støði í førleika, tørvi og umstøðum barnsins. Skúlaleiðarin hevur, í samráð við Sernám, skyldu til at tryggja, at undirvísingin eftir einstaklings undirvísingarætlanini verður skipað við atliti at gera barnið ført fyri aftur at luttaka í vanligu undirvísingini og sosiala felagsskapinum.

Barn, ið fær serundirvísing ella sernámsfrøðiligan stuðul, hevur rætt til læriætlan og menningarætlan. Flokstoymið ger ætlanina í samráð við Førleikastovuna og Sernám, sbrt. § 2, stk. 5 og 6 í kunngerð nr. 127 frá 12. september 2018 um serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul.

Umboðsmaðurin mæltu til, at tá eitt barn, so at siga, bara fær kreativa undirvísing, verða ítøkilig faklig mál innlimað í kreativu undirvísingarætlanina, soleiðis at barnið eisini mennist fakliga.

Umboðsmaðurin mælti til, at tá Undirvísingarstýrið biður ein skúla fáa til vega ein heimaundirvísingarlærara í avmarkað tíðarskeið, uttan at barnið er innskrivað í skúlan at ganga, má greiða fáast á, hvør skúli, sambært lóggávuni, hevur skyldur mótvegis næminginum, so sum at gera einstaklings undirvísingarætlan og at meta um úrtøkuna av undirvísingini.

Umboðsmaðurin mælti til, at stuðulslærarar verða játtaðir til fullan skúladag, tá tørvur er á tí. Um so er, at heimaundirvísingarlærari berst frá at undirvísa, eigur nýggjur heimaundirvísingarlærari at finnast skjótast gjørligt.

## 2. Viðvíkjandi eftirmetingum

Umboðsmaðurin vísti á, at tað er týdningarmikið fyri fakligu menningina av barninum, at mett verður um dygdina av menningar- og undirvísingarætlanum, og hvørja fakliga úrtøku barnið fær av undirvísingini, tí hetta er við til at tryggja, at barnið fær nøktandi undirvísing og rætt skúlatilboð.

Sambært § 5, stk. 3 í kunngerð um heimaundirvísing og sjúkraundirvísing skal lærari, sum hevur undirvíst næminginum, tryggja, at skúlin fær upplýsingar um heimaundirvísing og sjúkraundirvísing, úrtøku og støðu næmingsins, tá heimaundirvísing og sjúkraundirvísing enda.

Sambært § 4, stk. 3 í kunngerð um serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul hevur skúlaleiðarin ábyrgd av og fylgir við menningini og úrtøkuni hjá næminginum, sum fær serundirvísing, sernámsfrøðiligt átak og/ella sernámsfrøðiligan stuðul.

Sambært § 12, stk. 1 í kunngerð um at skipa serligan skúla ella undirvísingartilboð skulu einstaklings læruætlan og menningarætlan fyri næmingin eftirmetast hálvárliga.

## 3. Viðvíkjandi tvørfakligum samstarvi

Tað er umráðandi, at bæði sosialar myndugleikar, skúlamyndugleikar og heilsumyndugleikar samstarva tvørfakligt og einsrættað í málinum hjá einum barni, sum hevur trupult við at røkja sína undirvísingarskyldu. Netverksfundir eiga at verða hildnir eftir tørvi, har støðan hjá barninum verður eftirmett, soleiðis at onnur og fleiri tiltøk kunnu setast í verk sum skjótast, tá tað er neyðugt.

## 4. Serliga viðvíkjandi umsorganaryvirtiknum børnum

Tá myndugleikarnir yvirtaka umsorganina fyri einum barni, átaka teir sær samstundis ábyrgdina av, at barnið fær nøktandi undirvísing.

Umboðsmaðurin mælti til, at avgerandi dentur verður lagdur á skúlagongdina hjá barninum í sambandi við umsorganaryvirtøku, tí góð skúlagongd er ein týðandi partur av lívinum hjá barninum. Um gjørligt, eigur ein ítøkilig meting at verða gjørd, áðrenn barnið verður umsorganaryvirtikið, um vanligur skúli ella sertilboð hóskar best til tørvin hjá barninum. Barnið eigur at byrja í einum hóskandi skúlatilboði beinanvegin, tað er umsorganaryvirtikið. Ein ætlan eigur at vera fyri barnið, sum tryggjar samanhang í skúlagongdini, fakliga menning, stuðul eftir tørvi og trivna í skúlanum, so sleppast kann undan ov nógvum skúlaskiftum.

Um tað ikki slepst undan, at barnið skiftir skúla, skal barnið takast við í tilgongdini, og hóskandi dentur skal leggjast á barnsins sjónarmið. Skiftið eigur at vera varisligt og vera lagt væl til rættis við felags ábyrgd millum myndugleikar, skúla og bústovn/fosturheim.



MÁL NR 21/07682

## Kanning av fyrisitingarligu viðgerðini av 68 matrikkulmálum hjá Umhvørvisstovuni innan journalbólkarnar marknaseting, marknaumskipan, samanlegging, sundurbýti, sundurbýti til samanlegging, umbýti og umskipan.

Talan var bæði um rættuliga gomul mál og heilt nýggj mál. Málini vóru ymisk, og talan var bæði um mál, sum fyrisitingarliga mugu metast at vera lutfalsliga løtt at viðgera, og um mál, sum vóru trupul og tíðarkrevjandi at avgreiða.

Umboðsmaðurin helt, at yvirhøvur var málsviðgerðartíðin hjá Umhvørvisstovuni í so long og í fleiri førum alt ov long.

Eisini viðmerkti umboðsmaðurin, at hann hevði lagt til merkis, at hóast málsgongdin sambært Umhvørvisstovuni var skipað við føstum leisti og eftirlitslistum, so tyktist málsgongdin í einstøku málunum heldur tilvildarlig. Málini tyktust ikki nóg neyvt gjøgnumgingin við móttøku, og neyðugu avgreiðslustigini vórðu oftani ikki sett í verk nóg skjótt. Summi mál høvdu tí ligið still uttan viðgerð í mánaðir og í onkrum føri í nøkur ár.

Umboðsmaðurin kundi í fleiri førum staðfesta, at Umhvørvisstovan ikki fylgdi málinum og sendi ikki áminningar, tá myndugleikar ikki svaraðu uppá eina áheitan um ummæli. Umboðsmaðurin helt, at Umhvørvisstovan átti at skipað sær eina fasta mannagongd at senda áminningar við jøvnum millumbilum, so skundast kundi undir at fáa málini nøktandi upplýst.

Umboðsmaðurin viðmerkti eisini, at hann legði til merkis, at Umhvørvisstovan í summum førum lat mál liggja í bíðistøðu, heldur enn at avvísa/nokta umsóknir, tá umsøkjarin innan ávísa freist ikki virkaði fyri at upplýsa eitt mál nøktandi, ella tá tað var greitt, at umsóknin ikki kundi fremjast uttan t.d. broyting í eini byggisamtykt.

Sum heild viðmerkti umboðsmaðurin, at tá ein stovnur yvir longri tíð hevði so mong mál í bíðistøðu, og tá staðfestast kundi, at árlig sakargjøgnumgongd ikki var nóg mikið til at skunda undir viðgerðina, átti leiðslan á stovninum at taka neyðug stig til at kanna, hvat kundi skunda undir viðgerðina. Umboðsmaðurin helt, at leiðslan í hesum sambandi átti at kanna, um málini kundu avgreiðast skjótari við at betra um viðgerðargongdirnar við einum tíðaravmarkaðum eyka átaki, og um neyðugu tøkniligu og fyrisitingarligu førleikarnir vóru til staðar, ella um talan var um støðugt vantandi starvsfólkaorku.

Samanumtikið var tað fatanin hjá umboðsmanninum, at málsviðgerðartíðin hjá Umhvørvisstovuni kundi verið stytt nakað við eini meira effektivari málsgongd t.d. við, at málini vórðu sett í gongd skjótari og við at senda áminningar.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at hann helt seg síggja ávísan bata á hesum øki síðstu tíðina, og at Umhvørvisstovan nú tyktist at hava lagt seg eftir at avgreiða tey meira einføldu málini sum skjótast, soleiðis at hesi mál ikki koma í óneyðuga bíðistøðu.



MÁL NR 21/19719

## Kanning av næmingaráðum í fólkaskúlum, fRískúlum og serskúla

Umboðsmaðurin gjørdi eina kanning av næmingaráðum í fólkaskúlum, fRískúlum og serskúla. 41 skúlar luttóku í kanningini. Í sambandi við kanningina sendi umboðsmaðurin skúlunum hesar spurningar:

1. Hvussu nógvir næmingar eru í tykkara skúla, og hvørji floksstig hevur skúlin?
2. Er næmingaráð skipað í tykkara skúla?
3. Um ja, hvussu fer val av næmingaráði fram?
4. Hvussu er næmingaráðið skipað, t.d. tal, aldur og kyn av limunum í næmingaráðnum?
5. Hvussu ofta hittist næmingaráðið, og hvør samskipar fundirnar?
6. Hvønn leiklut hevur næmingaráðið í virksemi skúlans?
7. Nevn minst trý dømi um, hvussu tykkara skúli ítøkiliga hevur tikið atlit at sjónarmiðum hjá næmingaráðnum og/ella einum bólki av næmingum.

Svarini frá skúlunum vístu, at 22 av teimum 41 skúlunum høvdu næmingaráð – 21 fólkaskúlar og ein fRískúli. Talan var um 33 næmingaráð íalt. Bara 5 skúlar høvdu næmingaráð, har øll floksstig í skúlanum vórðu umboðað. Kynsbýtið var javnt í 12 næmingaráðum, meiriluti av dreingjum var í 9 næmingaráðum, meiriluti av gentum var í 8 næmingaráðum, meðan kynsbýtið ikki var upplýst fyri tey seinastu 4 næmingaráðini.

19 skúlar høvdu ikki næmingaráð - 16 fólkaskúlar, tveir fRískúlar og ein serskúli. Teir flestu av teimum 19 skúlunum vóru smærri skúlar við undir 50 næmingum. Í § 56, stk. 2 í fólkaskúlalógini er ásett, at næmingarnir stovna eitt næmingaráð til hvønn skúla, ið hevur 5. ella eldri floksstig. Hóast hetta, vóru 11 fólkaskúlar við 5. ella eldri floksstigi, sum ikki høvdu næmingaráð.

Yvirskipað hevði umboðsmaðurin ta fatan, at næmingaráðini í nógvum skúlum vórðu tikin við uppá ráð í viðurskiftum, sum viðvíktu teimum og høvdu møguleika at ávirka umstøðurnar

í skúlunum. Í summum skúlum sá tað tó út til, at næmingaráðini mest skipaðu fyri tiltøkum og komu við ynskjum um leikur o.tíl., men at tey ikki vórðu tikin við uppá ráð í øðrum høpi viðvíkjandi formligum og praktiskum avgerðum í skúlanum, sum eisini ávirkaði tey.

Umboðsmaðurin vísti á, at tað er týdningarmikið, at næmingarnir verða hoyrdir í viðurskiftum, sum viðvíkja teimum, og at sjónarmiðini hjá øllum næmingum á øllum floksstigum verða umboðað og hoyrd, uttan mun til aldur, og at dentur verður lagdur á sjónarmiðini hjá næmingunum í samsvari við aldurin og búnaskap hjá næmingunum, í samsvari við grein 12 í Barnarættindasáttmálanum.

Umboðsmaðurin vísti á, at børn og ung skulu liva við teimum avgerðunum, sum tey vaksnu taka. Skúlarnir eiga at taka børn og ung við í arbeiði sítt, tí avgerðir viðvíkjandi børnum og ungum, verða betri, tá børn og ung eru við og hava møguleika at ávirka mál, sum snúgva seg um tey. Tað er týdningarmikið, at børn so tíðliga sum møguligt læra um og eru við í fólkaræðisligum mannagongdum. Tey skulu merkja, at luttøka teirra er týdningarmikil, og at tey hava ávirkan. Hetta viðførir, at tey verða meira áhugað í samfelagnum, taka felags ábyrgd og læra fólkaræðisliga mannagongd og atferð. Samansetingin í næmingaráðunum eigur at vera fjølbroytt, og valdu umboðini eiga at vera í øllum aldri og javnsett í kyni. Næmingaráð kunnu verða við til áhaldandi at skipa luttøku av børnum og ungum í avgerðum hjá skúlunum og harvið geva børnum og ungum møguleika fyri at útinna síni rættindi og verða hoyrd og hava ávirkan á avgerðir, sum viðvíkja teimum.

Umboðsmaðurin mælti til, at teir 11 fólkaskúlarnir við 5. ella eldri floksstig, sum ikki høvdu næmingaráð, ráddu næmingunum til og skipaðu fyri, at næmingarnir stovnaðu næmingaráð sambært ásetingini í fólkaskúlalógini.

Umboðsmaðurin mælti til, at skúlarnir tryggjaðu, at næmingar á øllum floksstigum vórðu hoyrdir og høvdu møguleika at ávirka viðurskifti, sum viðvíktu teimum.

Umboðsmaðurin mælti til, at ásetingar um at stovna næmingaráð ella um skipaða hoyring av næmingunum vórðu settar inn í frískúlalógina og serskúlalógina.

Umboðsmaðurin mælti til, at skúlarnir tóku atlit at fjølbroytni, so sum aldur og kyn, í sambandi við val og skipan av næmingaráðum.

Umboðsmaðurin mælti til, at skúlarnir vóru varugir við, at næmingaráðini ikki bara vórðu hoyrd og høvdu ávirkan, tá skipast skuldi fyri undirhaldi o.tíl., men at tey eisini vórðu tikin við uppá ráð, tá aðrar avgerðir vórðu tiknar í skúlanum ella viðvíkjandi skúlanum, sum hevði ávirkan á gerandisdagin hjá næmingunum.

Vísandi til § 31, stk. 1 í skúlafyrisitingarlógini og § 56, stk. 3 í fólkaskúlalógini heitti umboðsmaðurin á landsstýrismannin í skúlamálum um at áseta reglur viðvíkjandi næmingaráðsvali og skipan og virksemi í næmingaráðum, soleiðis at næmingar fingu greiða atgongd og ítøkilig rættindi at taka lut í virksemi skúlans.



almannaverkið
almannaverkið
18

MÁL NR 22/03832

## Eftirlitsvitjan á trimum sambýlum hjá Almannaverkinum, sum eru fyri fólk við sálarsjúku

Endamálið við vitjanini hjá Løgtingsins umboðsmanni á sambýlum fyri fólk við sálarsjúku var at kanna um fólk við sálarsjúku, sum búgva á sambýlum, verða virðiliga viðfarin, og teirra rættindi verða vird. Eisini var kannað, hvussu samstarvið millum myndugleikarnar (Psykiatriska depilin og bústovnarnar fyri fólk við sálarsjúku), sum arbeiða við fólki við sálarsjúku, virkar.

Á vitjanunum legði umboðsmaðurin dent á at fáa lýst dagligdagin hjá búfólkunum, og vórðu í hesum sambandi umrødd hesi evni :

- Sambond (relatiónir)
- arbeiði, undirvísing og frítíð
- búfólkasamanseting
- heilsuviðurskifti
- valdsnýtsla og onnur inntriv

Umboðsmaðurin var á fráboðari eftirlitsvitjan á hesum sambýlum:

- Sambýlið Eiðisgarður í Vági, 4. apríl 2022
- Sambýlið á Húsadalsvegi í Sørvági, 2. mai 2022
- Sambýlið á Traðarvegi í Sandavági, 4. mai 2022

Sambýlini eru vardir bústaðir skipaðir við heimild í § 32 í áður galdandi forsorgarlóg, nú § 46 í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd.

Sambært § 46 í lógini um almannatrygd verður vardur bústaður, herundir sambýlispláss, veitt persóni, sum hevur týðandi likamligt ella sálarligt brek ella víðfevndar sosialar trupulleikar og hevur tørv á hjálp og stuðli til vanligt dagligt virksemi umframt møguliga røkt. Endamálið við vardum bústaði er at veita persóni eitt heim, har viðkomandi kann liva eitt sjálvstøðugt, støðugt, innihaldsríkt og virkið lív.

Áðrenn vitjanina á sambýlunum vórðu búfólk, við uppsløgum á sambýlunum, kunnaði um, at umboðsmaðurin kom á eftirlitsvitjan, og at tey, sum ynsktu tað, høvdu møguleika at tosa við umboðsmannin um viðurskiftini á stovninum ella um teirra privatu viðurskifti.

Eftirlitsvitjaninar vóru skipaðar soleiðis:
Byrjað varð við einum fundi við leiðsluna fyri sambýlið og umboð fyri starvsfólkið. Eftir fundin varð víst runt í húsinum. Síðani tosaði umboðsmaðurin við tey búfólk og starvsfólk, sum høvdu biðið um samrøðu við umboðsmannin. At enda var samrøða við leiðsluna fyri sambýlið, har tikið varð samanum dagin.

Umboðsmaðurin hevur gjørt frágreiðingar frá hesum trimum eftirlitsvitjanunum. Frágreiðingar eru grundarlag undir teimum samandráttum, sum kunnu lesast í fylgiskjølunum 1-3, har ið tikið verður samanum frá vitjanini á hvørjum einstakum sambýli, og hvørji tilmæli umboðsmaðurin hevur givið.

Almannaverkið, Almannamálaráðið, Heilsumálaráðið og Psykiatriski depilin hava fingið høvi at gera viðmerkingar til frágreiðingina. Endaliga frágreiðingin var send nevndu myndugleikum, Sinnisbata og Løgtinginum.

### Viðmerkingar og tilmæli

Í mun til evnini, sum vórðu umrødd á vitjanunum, hevði eg samanumtikið hesar viðmerkingar:

### Viðvíkjandi sambondum (relatiónir)

Vitjanirnar hava givið mær ta fatan, at sambýlini stuðla búfólkunum í at hava samband bæði við síni avvarðandi, vinir og onnur búfólk, men at tey eldru á sambýlum við tíðini gerast meira og meira einsamøll, tá familjan fellur frá. Eg havi í hesum sambandi yvirfyri Almannaverkinum víst á, at tá persónar fáa boðið sambýlispláss, er, umframt búfólkasamansetingina v.m., eisini neyðugt at taka atlit at fjarstøðuni millum sambýli og familjuna, so fjarstøðan ikki er orsøk til at sambandið við familjuna ikki kann røkjast.

### Viðvíkjandi arbeiði, undirvísing og frítíð

Eg haldi meg kunna staðfesta, at starvsfólkini á sambýlunum leggja stóran dent á, at búfólkini eftir førimuni eru so virkin sum gjørligt bæði í mun til arbeiði, undirvísing og frítíð. Tað tykist tó samstundis, sum stórur aldursmunur á búfólkunum á onkrum av sambýlunum ger, at tað er avbjóðandi hjá sambýlinum at skipa fyri tiltøkum, sum flestu búfólkini kunnu vera felags um.

### Viðvíkjandi búfólkasamanseting

Upplýsingarnar, ið eg havi fingið undir vitjanini, vísa, at búfólkasamansetingin er ein afturvendandi avbjóðing hjá sambýlunum, bæði tí tørvur er á fleiri búplássum, og tí búfólkini vegna ymiskan aldur og sjúku hava ymiskan tørv.

Tey vitjaðu sambýlini eru sosialt námsfrøðilig tilboð og ikki røktartilboð. Hetta, og at tørvur er á fleiri bútilboðum, kann føra til, at tilboðini, sum sambýlini kunnu veita til nøkur av búfólkunum við sálarligari sjúku, ikki eru nøktandi. Hetta ger seg serliga galdandi, tá røktartørvurin hjá eldru búfólkunum økist so munandi, at tað avmarkar tænastuna, sum sambýlið kann veita til hini búfólkini. Spurningurin er tá eisini, nær tænastan, sum veitt verður á sambýlinum, ikki longur samsvarar við endamálið á sambýlinum, men er á veg til at vera eitt røktartilboð.

Eg havi spurt Almannamálaráðið um hesi viðurskifti. Ráðið hevur svarað, at spurningurin um røktarheimspláss til eldri sálarsjúk, ið frammanundan hava sambýlispláss, er eitt øki, sum er umskarað millum land og kommunu. Sambært ráðnum er ætlanin at greina hetta økið nærri, so tað gerst greitt, um arbeiðast skal við eini skipan, har eldri við sálarsjúku,

sum búgva á sambýlum hjá Almannaverkinum, skulu fáa røktarheimspláss á jøvnum føti við aðrar eldri borgarar í avvarðandi kommunu ella um byggjast skulu búeindir til endamálið.

### Viðvíkjandi heilsuviðurskiftum

Eg haldi meg kunna staðfesta, at starvsfólkini á sambýlunum eggja búfólkunum til at hugsa um sína heilsu, bæði tá kemur til kost og rørslu, men at tey samstundis virða sjálvsavgerðarrættin hjá einstaka búfólkinum. Búfólk, sum hava heilsutrupulleikar, fáa eisini ítøkiliga ráðgeving í mun til egna støðu.

### Viðvíkjandi valdsnýtslu og øðrum inntrivum

Sambýlini hava reglugerðir og skipanir um fráboðan av valdnýtslu og harðskapi, og Almannaverkið hevur áhaldandi arbeitt við at kunna og útbúgva starvsfólk í at handfara tvístøður og harðskapsstøður. Hóast hetta kom undir vitjanunum fram, at starvsfólk eru í iva um, nær harðskapur – serliga sálarligur harðskapur – skal fráboðast. Eg havi tí mælt til, at Almannaverkið framhaldandi arbeiðir við at kunna og menna starvsfólkini á hesum øki.

## Aðrar viðmerkingar

### Fíggjarlig viðurskifti

Eg havi í frágreiðing míni mint Almannaverkið á, at tey eiga at kunna búfólkini, sum eru yvir 67 ár, á møguleikan at søkja um lækkaða húsaleigu.

### Bygningarnir

Viðvíkjandi Eiðisgarði havi eg í frágreiðing míni víst á, at tørvur var á ymiskum ábótum. Almannaverkið hevur nú fráboðað, at ein loysn er funnin, so Landsverk í næstum fer undir at fremja bráðfeingis ábøtur í bygninginum og seinni at gera aðrar bygningsábøtur. Viðvíkjandi sambýlinum á Húsadalsvegi í Sørvági havi eg víst á, at bygningurin tørvaði tillagingar, um so var, at búfólk vóru við avmarkaðum flytiføri. Viðvíkjandi sambýlinum á Traðarvegi í Sandavági vísti leiðslan á, at tørvur var á smávegis ábótum, og havi eg mælt til, at øll búfólk hava egið vesi og bað. Eg eri seinni kunnað um, at Almannaverkið hevur sett gongd á at gera hesar ábøtur.

### Myndugleikasamstarv

Eg havi á vitjanunum og í skrivi til Psykiatriska depilin spurt, hvussu samstarvið millum sambýlini og Psykiatriska depilin virkar. Sambýlini og Psykiatriski depilin lata væl at samstarvinum sínámillum. Frá sambýlunum var tó ynski um léttari atgongd til hjálp og vegleiðing eftir vanliga arbeiðstíð hjá kommunulæknum og økispsykiatriini. Psykiatriski depilin hevur í hesum sambandi víst til Læknavaktina 1870. Frá Heilsumálaráðnum eri eg kunnað um, at arbeitt verður við at førleikamenna starvsfólk á Psykiatriska deplinum til at røkja bráðfeingis sálarhjálp funktiónina, ið skal knýtast at Læknavaktini 1870, so persónar, sum hava bráðfeingis tørv á sálarhjálp, kunnu venda sær ella verða vístir til hesa funktión.

## Greiðari reglur

Í frágreiðingini havi eg víst á, at í nøkrum førum eru fleiri ymiskar reglur galdandi fyri somu viðurskifti hjá sambýlunum, og at hetta skapar ógreidleika. Almannamálaráðið hevur greitt frá, at farið verður undir at skipa hesar reglur betri, og at ávísar reglur við heimild í áður galdandi forsorgarlóg verða settar úr gildi.

# 8 Avvístar klagur

Orsøkin til, at umboðsmaðurin ikki viðger eina klagu, kann vera av formligum slag, so sum at klagan kemur ov seint, ella at ovasti myndugleiki á økinum ikki hevur tikið endaliga avgerð í málinum. Flestu klagur verða tó avvístar ella ikki viðgjørdar, tí umboðsmaðurin ikki metir seg hava nakað grundarlag fyri at gera meira við klaguna.

Niðanfyri eru dømir um mál, sum umboðsmaðurin hevur avvíst av ymiskum orsøkum.

**Umboðsmaðurin kann einans viðgera mál, sum eru viðgjørd av myndugleikum ella stovnum, sum hoyra til almennu fyrisitingina undir heimastýrinum (Umboðsmanslógin § 4, stk. 1)**

## MÁL NR 22/13614

Ein borgari klagaði um Føroya Politi. Umboðsmaðurin boðaði klagaranum frá, at Føroya Politi er danskur myndugleiki, og at umboðsmaðurin tí ikki kann viðgera klagur um Føroya Politi. Umboðsmaðurin vísti á, at klaga um Føroya Politi í staðin kundi sendast Den Uafhængige Politiklagemyndighed, sum m.a. viðger klagur um atferð hjá politimyndugleikanum.

## MÁL NR 22/15646

Eitt áhugafelag fyri fólk við ávísum sjúkum vendi sær til umboðsmannin um eina avgerð hjá Landssjúkrahúsinum, har Landssjúkrahúsið hevði skert eitt viðgerðartilboð, sum felagið metti at fleiri av teirra limum høvdu tørv á. Felagið metti, at avgerðin var tikin á skeivum grundarlagi og uttan at hoyra tey og teirra limir, sum ein viðkomandi partur í málinum.

Umboðsmaðurin metti, at tilboðið, ið talan var um, fyrst og fremst var eitt heilsufakligt mál, har Landssjúkrahúsið út frá heilsufakligum atlitum hevði avgjørt, hvat tilboð varð veitt framyvir. Vísandi til, at viðgerðarheimildin hjá umboðsmanninum ikki fevnir um heilsufaklig mál, men bert um fyrisitingarligar spurningar, segði umboðsmaðurin, at hann ikki kundi hjálpa felagnum við hesum parti av málinum.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at tann parturin av málinum, sum snúði sum um broyting av mannagongdum, og nær og hvussu ein myndugleiki hoyrir og kunnar áhugafeløg og borgarar, kundi møguliga vera av fyrisitingarligum slagi. Av tí at skjølini vístu, at felagið eisini hevði sent Heilsumálaráðnum skriv um hesi viðurskifti, kundi væntast, at Heilsumálaráðið fór at viðgera fyrisitingarliga partin av málinum, tá ráðið fór at svara felagnum.

Umboðsmaðurin greiddi frá, at hann viðger ikki mál, fyrr enn avvarðandi myndugleiki er liðugur við sína viðgerð, og tá málið enn mátti metast at vera í viðgerð hjá Heilsumálaráðnum, kundi umboðsmaðurin í løtuni ikki hjálpa felagnum við málinum.

## MÁL NR 22/17926

Ein borgari klagaði til umboðsmannin og ynskti, at umboðsmaðurin gjørdi eina meting av, um ein avtala millum tveir partar, annar almennur og hin privatur, kundi metast sum skjalafalsan.

Umboðsmaðurin boðaði klagaranum frá, at fyrispurningar um skjalafalsan eru uttanfyri heimildarøkið hjá umboðsmanninum.

## MÁL NR 22/22674

Ein borgari klagaði til umboðsmannin og fleiri aðrar myndugleikar um støðið av viðgerð, sum millum annað Landssjúkrahúsið veitti klagaranum og kvinnum í Føroyum sum heild í sambandi við viðgongu.

Við tað at klagur um heilsufakligt virksemi hoyra undir Styrelsen for Patientklager, avvísti umboðsmaðurin klaguna. Umboðsmaðurin sendi avrit av skrivi sínum til kunningar til hinar myndugleikarnar, ið høvdu fingið klaguna og væntandi fóru at svara borgaranum.

**Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað. Klagarin skal navngeva seg (Umboðsmanslógin § 6, stk. 2)**

## MÁL NR 22/14533

Ein mamma klagaði um tilrættislegging av undirvísingini og handfaringina hjá einum skúla av støðuni hjá barni hennara, undir hesum skipanina at býta upp í førleikastig og hoyring av næmingum í hesum sambandi og undirvísingarhátt og krøv til næmingar.

Viðurskiftini viðvíkjandi barninum vóru farin fram meira enn eitt ár frammanundan klaguni til umboðsmannin. Umboðsmaðurin boðaði tí mammuni frá, at hann ikki fekk hjálpt mammuni við hesum.

Viðvíkjandi ynskinum um grundleggjandi broytingar í skúlanum og skipanini annars í sambandi við tilrættislegging av undirvísing og tiltøkum, sum kunnu hjálpa næmingum, sum ikki megna karmarnar hjá skúlanum, mælti umboðsmaðurin mammuni til at venda sær til skúlastýrið fyri skúlan og Uttanríkis- og mentamálaráðið, sum yvirskipaður myndugleiki hjá fólkaskúlanum.

**MÁL NR 22/18578**

Borgari vendi sær í oktober 2022 til umboðsmannin við eini klagu um Tórshavnar kommunu. Í klaguni var víst á, at kommunan ikki hevði hoyrt viðkomandi sum granna í einum byggimáli.

Umboðsmaðurin bað kommununa um frágreiðing og skjøl um málið. Tórshavnar kommuna greiddi frá, at byggiloyvið var givið samsvarandi almennu byggisamtyktini og bygningskunngerðini, og tá undantak ikki var givið í sambandi við byggiloyvið, var klagarin ikki grannahoyrdur. Tá umboðsmaðurin spurdi, um kommunan hevði viðgjørt spurningin um, hvørt klagarin var partur í málinum, svaraði kommunan, at hon hevði mett, at klagarin ikki var partur í málinum, og tí var viðkomandi heldur ikki partshoyrdur um málið. Eingin avgerð var send klagaranum um hendan spurning.

Umboðsmaðurin viðmerkti, at ein verulig partshoyring av einum parti í einum byggimáli eigur at byrja, áðrenn byggimálið av álvara fer í gongd, soleiðis at viðmerkingar frá einum parti, kunnu hava tíðarbæran týdning fyri málið. Tá so long tíð var fráliðin frá, at byggiloyvið var givið, og byggimálið longu var framt, var spurningurin um klagarin burdi verið partshoyrdur, sambært § 18 í fyrisitingarlógini, í fyrstu atløgu av meira teoretiskum slagi enn av týdningi fyri byggiloyvið/ byggingina. Møguleikin at biðja kommununa um avgerð viðvíkjandi spurninginum um partsstatus, var tó enn til staðar.

Sambært upplýsingunum í málinum sást, at í august 2021 byrjaði eitt samskifti millum kommununa og klagaran um byggimálið, og at kommunan í hesum sambandi kunnaði klagaran um, at byggiloyvið var givið. Tá tað sostatt var greitt, at klagarin fekk kunnleika til byggiloyvið meira enn eitt ár frammanundan klaguna til umboðsmannin, vísti umboðsmaðurin til 1 ára regluna í § 6, stk. 2 í umboðsmanslógini og boðaði klagaranum frá, at av hesum kundi umboðsmaðurin ikki viðgera klaguna.

## Hægsti myndugleiki á økinum skal hava tikið avgerð í málinum, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu um eitt mál (Umboðsmanslógin § 6, stk. 3)

**MÁL NR 22/01710**

Ein borgari klagaði um handfaringina hjá Tórshavnar kommunu av einari klagu um tyrving. Málið snúði seg um, at ein borgari hevði sent Tórshavnar kommunu eina klagu um álvarsliga dálking á einum matrikuli í kommununi. Eftir at málið hevði verið kannað, sendi Tórshavnar kommuna eitt avgerðarskriv til borgaran um, at talan ikki var um álvarsliga dálking.

Avgerðin hjá Tórshavnar kommunu var síðani kærd til Umhvørvisstovuna, ið heimvísti málið til nýggja viðgerð hjá Tórshavnar kommunu.

Tórshavnar kommuna vísti eftirfylgjandi á, at kommunan ikki var hoyrd í málinum, áðrenn Umhvørvisstovan heimvísti málið til nýggja viðgerð hjá kommununi. Tískil ynskti kommunan, at Umhvørvisstovan framdi hesa hoyring, áðrenn Umhvørvisstovan tók eina avgerð í málinum.
Eftir at umboðsmaðurin hevði spurt um málið, boðaði Tórshavnar kommuna umboðsmanninum frá, at kommunan hóast alt fór undir at viðgera málið av nýggjum.

Umboðsmaðurin boðaði síðani klagaranum frá, at umboðsmaðurin ikki fekk viðgjørt eina klagu um málið, fyrr enn Tórshavnar kommuna hevði tikið eina endaliga avgerð og møguleikin fyri at kæra til Umhvørvisstovuna harumframt hevði verið nýttur.

## MÁL NR 22/06276

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um, at Almannaverkið metti hann sum sambúgvandi í sambandi við veitingina frá Almannaverkinum. Eisini var hann ónøgdur við, at hann ikki slapp at skifta málsviðgera.

Umboðsmaðurin spurdi Almannaverkið um málið. Almannaverkið greiddi frá, hví veiting klagarans var broytt frá at vera veiting til stakan til at vera veiting sum sambúgvandi, og hví ynski um ávísan málsviðgera ikki var gingið á møti. Orsakað av innanhýsis mistaki, hevði klagarin einans fingið munnliga avgerð um broyttu veitingina, og Almannaverkið hevði tí nú undir klaguviðgerðini sent klagaranum skrivliga avgerð við kæruvegleiðing til Føroya Kærustovn.

Umboðsmaðurin vísti á, at sambært § 6, stk. 3 í umboðsmanslógini kunnu klagur um avgerðir, ið ein møguligur hægri fyrisitingarmyndugleiki kann broyta, ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Av hesum metti umboðsmaðurin, at hann ikki kundi viðgera klaguna um broyttu veitingina, fyrr enn hon var kærd til Føroya Kærustovn, og Kærustovnurin hevði tikið endaliga avgerð í málinum.

## MÁL NR 22/12731

Ein borgari klagaði um, at hann ikki fekk útgoldið lønarískoyti við afturvirkandi gildiskomu, eftir at hann hevði bíðað í næstan 9 mánaðir eftir avgerð frá Almannaverkinum í einum máli um arbeiðsbúgving.

Almannaverkið greiddi frá, at einki sást í málinum um, at Almannaverkið hevði játtað ella givið borgaranum lyfti um lønarískoyti við afturvirkandi gildiskomu. Av tí at umbønin um afturvirkandi lønarískoyti ikki formliga hevði verið viðgjørd, sendi Almannaverkið klagaranum eina avgerð um, at afturvirkandi lønarískoyti bleiv noktað. Avgerðin kundi kærast til Føroya Kærustovn.

Umboðsmaðurin boðaði síðani klagaranum frá, at umboðsmaðurin ikki kundi viðgera eina klagu um hesa avgerðina, fyrr enn hon var kærd til Føroya Kærustovn, og Føroya Kærustovnur hevur tikið endaliga avgerð í málinum.

## MÁL NR 22/17123

Ein mamma klagaði um vantandi tilboð um frítíðarskúla í ferium til son sín. Í skjølunum, sum klagarin sendi umboðsmanninum, lá eitt skriv frá borgarstjóranum í kommununi. Umboðsmaðurin metti skrivið at vera eina fyrisitingarliga avgerð og boðaði mammuni frá, at hann ikki kundi viðgera eina klagu um avgerðina hjá kommununi, fyrr enn avgerðin var kærd til Uttanríkis- og mentamálaráðið, sum sambært § 11, stk. 1 og 2 í Dagstovnalógini var kærumyndugleiki viðvíkjandi avgerðini, og ráðið hevði tikið endaliga avgerð í málinum.

## MÁL NR 22/18600

Tveir borgarar klagaðu um, at Tórshavnar kommuna ikki hevði havt góðan demokratiskan, fyrisitingarligan atburð í einum byggimáli, og at persónar við nógvum pengum kunnu fáa stórt frávik frá almennu byggisamtyktini, meðan onnur mugu halda seg til almennu byggisamtyktina. Borgararnir høvdu eisini sent kæru til Landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, sum umsitur byggisamtyktir.

Klagan snúði seg um uppskot til serstaka byggisamtykt fyri miðbýarkjarnuna, sum sambært Tórshavnar kommunu var liðugt viðgjørt í kommununi og fór at vera sent landsstýrismanninum í umhvørvis- og vinnumálum til góðkenningar.

Við tað at málið um serstaka byggisamtykt fyri miðbýarkjarnuna enn var undir viðgerð í fyrisitingini, kundi umboðsmaðurin fyribils ikki viðgera klaguna.

## MÁL NR 22/21471

Eitt fosturforeldur klagaði um Almannaverkið viðvíkjandi vantandi umlætting til fosturbarn sítt.

Sambært skjølum í málinum hevði Almannaverkið sent fosturforeldrinum eina avgerð, har umlætting var noktað, meira enn 4 mánaðir frammanundan, at fosturforeldrið klagaði til umboðsmannin. Almannaverkið hevði upplýst fyri fosturforeldrinum, at avgerðin kundi kærast til Føroya Kærustovn við eini freist á 4 vikur.

Fosturforeldrið upplýsti fyri umboðsmanninum, at avgerðin ikki var kærd til Føroya Kærustovn. Av tí at fosturforeldrið ikki hevði kært avgerðina hjá Almannaverkinum

til Føroya Kærustovn, kundi umboðsmaðurin ikki viðgera klaguna um avgerðina hjá Almannaverkinum og grundarlagið undir avgerðini.

**Grundarlag er ikki fyri at gera meira við klaguna (Umboðsmanslógin § 6, stk. 4)**

**MÁL NR 22/02602**

Eitt foreldur klagaði um vantandi svar frá eini barnaverndartænastu upp á innlitsumbøn. Í teldubrævasamskifti millum klagaran og barnaverndartænastuna sást, at klagarin hevði sent barnaverndartænastuni umbøn um innlit dagin fyri, hann klagaði til umboðsmannin, og at klagarin skuldi hava fund við barnaverndartænastuna sama dag, sum hann klagaði til umboðsmannin.

Barnaverndartænastan upplýsti fyri umboðsmanninum, at klagarin fyrr hevði fingið innlit í øll skjøl í málinum, og at klagarin á fundinum sama dag fór at fáa innlit í nøkur notat frá einum fundi, sum barnaverndartænastuna hevði havt við klagaran 2 mánaðir frammanundan. Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at gera meira við klaguna.

**MÁL NR 22/04041**

Ein borgari klagaði um vantandi svar frá Fiskimálaráðnum upp á ymiskar spurningar, hann hevði sett ráðnum viðvíkjandi fyrisiting av fiskivinnumálum. Borgarin hevði sent Fiskimálaráðnum spurningarnar 15 dagar innan klaguna til umboðsmannin.

Umboðsmaðurin boðaði klagaranum frá, at hann ikki helt grundarlag vera fyri at gera meira við klagu hansara, tí so stutt var fráliðið, síðani hann sendi Fiskimálaráðnum skrivið við spurningunum.

**MÁL NR 22/05930**

Ein advokatur klagaði, vegna eitt viðskiftafólk, um avgerðarvirksemi í einum barnaverndarmáli og gegnið hjá sálarfrøðinginum, sum hevði gjørt foreldraførleikakanningina í sambandi við barnaverndarmálið.

Advokaturin helt, at foreldraførleikakanningin mátti metast at vera ein avgerð, tí metingarnar og niðurstøðurnar hjá sálarfrøðinginum í foreldraførleikakanningini fóru at hava við sær, at barnaverndartænastan fór at seta ávís tiltøk í verk mótvegis viðskiftafólki hansara.

Advokaturin førdi eisini fram, at sálarfrøðingurin var ógegnigur at gera foreldraførleikakanningina, tí hann hevði kunnleika um viðskiftafólki frammanundan.

Føroya Kærustovnur hevði áður avvíst kæru frá advokatinum um somu uppáhald við tí grundgeving, at talan var um útinnandi fyrisiting (faktiska fyrisiting), og at útinnandi fyrisiting ikki kann kærast til Føroya Kærustovn.

Umboðsmaðurin vísti á, at upplýsingarnar í eini foreldraførleikakanning verða saman við øðrum innheintaðum upplýsingum nýttir sum grundarlag fyri eini møguligari avgerð hjá barnaverndartænastuni um at seta fyriskipan í verk ella at gera tilmæli til Høvuðsbarnaverndarnevndina til avgerðar. Hóast upplýsingarnar í foreldraførleikakanningini kunnu viga tungt í samlaðu málsupplýsingini, so helt umboðsmaðurin ikki, at foreldraførleikakanningin er at meta sum eitt bindandi tilmæli til barnaverndartænastuna. Umboðsmaðurin vísti á, at sálarfrøðingurin er ikki ein myndugleiki, og hann skal ikki taka avgerð í málinum.

Umboðsmaðurin var tí samdur við Føroya Kærustovni í, at virksemi hjá sálarfrøðingi í sambandi við foreldraførleikakanning er útinnandi fyrisiting (faktisk fyrisiting).

Viðvíkjandi gegninum hjá sálarfrøðinginum vísti umboðsmaðurin á, at ein sálarfrøðingur, sum hevur kunnleika til familjuna frammanundan, eigur at meta um, í hvønn mun hetta hevur týdning fyri arbeiðið og kunna barnaverndartænastuna um hetta, áðrenn kanningin byrjar. Hervið kann barnaverndartænastan meta um, hvørt ein annar sálarfrøðingur, vegna gegnistrupulleikar, skal gera kanningina. Ein sálarfrøðingurin verður sostatt ikki uttan víðari ógegnigur at gera eina foreldraførleikakanning, av tí at hann hevur kunnleika um familjuna frammanundan, men greiða eigur at fáast á, áðrenn kanningin byrjar, um tað kann fara at ávirka arbeiðið hjá honum við kanningini, at hann hevur kunnleika um familjuna frammanundan.

Í skjølunum, sum advokaturin hevði sent umboðsmanninum, sást ikki, um sálarfrøðingurin hevði boðað barnaverndartænastuni frá, at hann kendi familjuna frammanundan. Barnaverndartænastan hevði tó mett, at tann sannroynd, at samband hevur verið millum partarnar frammanundan, ikki gjørdi, at síggjast skuldi burtur frá foreldraførleikakanningini.

Umboðsmaðurin vísti á, at sambært § 6, stk. 2 í fyrisitingarlógini verður spurningurin um ein persónur er ógegnigur avgjørdur av tí myndugleika, sum skal taka avgerð um realitetin í málinum. Sum meginregla kann avgerðin hjá myndugleikanum um gegni ikki kærast sjálvstøðugt til yvirskipaðan myndugleika, men kann bara leggjast fyri kærumyndugleikan í sambandi við kæru av avgerðini um realitetin í málinum.

Umboðsmaðurin var tí samdur við Føroya Kærustovni í, at spurningurin um gegnið hjá sálarfrøðinginum ikki framíhjá kundi kærast til Føroya Kærustovn.

Sum umboðsmaðurin skilti málið, varð antin talan um, at barnaverndartænastan fór at taka avgerð um fyriskipan, sum kundi kærast til Føroya Kærustovn, ella at eitt tilmæli frá barnaverndartænastuni, varð lagt til Høvuðsbarnaverndarnevndina til avgerðar.

Umboðsmaðurin helt tað tí vera rættast, at antin Føroya Kærustovnur í kæruviðgerð síni, ella Høvuðsbarnaverndarnevndin í sambandi við avgerð sína, tók støðu til ivamálini hjá advokatinum viðvíkjandi foreldraførleikakanningini.

Umboðsmaðurin helt ikki grundarlag vera fyri at gera meira við klaguna, og gjørdi tí ikki meira við málið

## MÁL NR 22/06554

Ein borgari klagaði um handfaringina hjá Almannaverkinum av máli sínum um flyting av fyritíðarpensjón til Danmarkar, og at pensjónin var steðgað uttan ávaring.

Eftir at hava fingið eina frágreiðing frá Almannaverkinum helt umboðsmaðurin ikki grundarlag vera fyri at gera meira við klaguna, við tað at gongd var á málinum um flyting av fyritíðarpensjónini, og Almannaverkið hevði í sambandi við íkomnu støðuna flutt eina veiting afturat.

## MÁL NR 22/12242

Eitt foreldur klagaði um, at ein barnaverndartænasta ikki vildi útflýggja sær passini hjá børnunum, sum vóru umsorganaryvirtikin. Barnaverndartænastan hevði upplýst í teldubrævið til klagaran, at klagarin fekk passini útflýggjað, um so var, at hann fekk brúk fyri passunum hjá børnunum.

Umboðsmaðurin vísti á, at hóast klagarin sum foreldramyndugleiki hevði givið loyvið til, at børnini fingu pass, so var vanligt, at passini fylgdu børnunum og vóru í varðveitslu har, sum børnini búðu fast.

Tað at barnaverndartænastan gjørdi av, at passini skulu vera í varðveitslu, har børnini búðu, helt umboðsmaðurin vera at meta sum útinnandi fyrisiting (faktisk forvaltning) í sambandi við, at børnini vóru sett heiman.

Umboðsmaðurin boðaði klagaranum frá, at hann ikki helt grundarlag vera fyri at gera meira við klagu hansara.

## MÁL NR 22/15506

Ein borgari klagaði um, at Vørn ikki hevði givið honum svar í sambandi við eina umbøn um alment innlit.

Í frágreiðing til umboðsmannin, greiddi Vørn frá, at talan var um, at klagarin í trimum umførum hevði sent Vørn skriv um innlit í upplýsingar viðvíkjandi fiskidøgum á Føroyabanka í 2022.

Av misgáum hevði Vørn ikki svarað triðja skrivinum frá klagaranum.
Vørn sendi eftirfylgjandi skriv til umboðsmannin um, at Vørn hevði tikið avgerð um at svara triðja skrivinum frá klagaranum.

Grundað á frágreiðingina frá Vørn og omanfyrinevndu avgerð, boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at grundarlag ikki var fyri at gera meira við klaguna frá klagaranum.

## MÁL NR 22/17757

Ein borgari vendi sær til umboðsmannin um noktandi avgerð frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum í sambandi við eina umsókn um at fáa nýtt eftirnavn. Eisini varð klagað um longu málsgongdina í málinum, har Umhvørvis- og vinnumálaráðið nú hevði tikið avgerð sum kærumyndugleiki eftir í tveimum førum at hava heimvíst málið til Umhvørvisstovuna til nýggja viðgerð uttan vegleiðing um, hvat Umhvørvisstovan ístaðin átti at leggja seg eftir.

Í samband við navnamálið hevði Umhvørvis- og vinnumálaráðið biðið Navnanevndina um ummælið.
Við hesi grundgeving mælti Navnanevndin frá at geva loyvi til ynskta eftirnavni: „Tað er navnanevndarinnar fatan, at fyrisitingarheimildir sum eftirnøvn skulu vísa til eitt ítøkiligt staðarnavn og harvið sernavn og vera vanligur partur av eini slíkari samansesting. T.d. í Selvindi, við Brúgv og á Trøðni. Navnanevndin metir ikki, at tað er rætt at loyva samansetingum við eitt og hvørt navnorð í eftirnøvnum. Tá er rættari at nýta navnaorðið einsamalt uttan fyriseting, um tað annars verður mett hóskandi sum eftirnavn.“

Avgerðin hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum var soljóðandi: „Av tí at navnorðið í fyristingarheildini í … ikki er eitt staðarnavn (sernavn), sum tygum hava tilknýti til, leggur Umhvørvis- og vinnumálaráðið til grund, at tað ikki hevði verið í samljóði við føroyskar málreglur at loyvt í … sum nýggjum eftirnavni.

Umsóknin sambært navnalógini § 10, stk. 1 um at fáa í … til nýtt eftirnavn verður tí vísandi til navnalógina § 10, stk. 3, nr. 4, ikki gingin á møti.“

Eftir at hava lisið klaguna, frágreiðingina frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum og skjølini í málinum boðaði umboðsmaðurin frá, at hann helt, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna. Hesa fatan bygdi hann fyrst og fremst á, at hann ikki hevði viðmerkingar til sjálva niðurstøðuna hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, sum var grundað á eina fakliga metan av, hvørt ynskta eftirnavnið var í samljóð við føroyskar málregur og sum í síni heild var gjølla lýst og grundgivin í avgerðini, sum var fráboðað

klagaranum. Harnæst var tað metan umboðsmansins, at leiðbeiningin, sum ráðið hevði givið Umhvørvisstovuni í sambandi við báðar heimvísingarnar, vóru av so mikið almennum slagi, at hetta ikki førdi til, at Umhvørvis- og vinnumálaráðið misti óheftni sum kærumyndugleiki. Eisini hevði ráðið eftir umstøðunum í málinum heimild at seta egna avgerð ístaðin fyri avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.

Umboðsmaðurin helt tó, at málsgongdin kundi verið stytt, um Umhvørvis- og vinnumálaráðið hevði givið Umhvørvisstovuni neyvari leiðbeining í sambandi við heimvísingarnar. Men tá hesi viðurskifti ikki høvdu ávirkan á endaligu niðurstøðuna í málinum, metti umboðsmaðurin at grundarlag var ikki fyri at gera meira við málið.

## MÁL NR 22/17870

Ein borgari klagaði um vantandi svar frá Strandfaraskipum Landsins uppá eina umbøn um alment innlit í skjøl, ið Strandfaraskip Landsins, sambært klagaranum, fór at senda til Fíggjarmálaráðið.

Eftir at hava lisið klaguna og tey skjøl, ið vóru í málinum, boðaði umboðsmaðurin klagaranum frá, at grundarlag ikki var fyri at gera meira við klaguna. Hesa fatan bygdi umboðsmaðurin á, at rætturin til alment innlit sambært § 4, stk. 1 og 3 í løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina fevnir um tey skjøl og tær upplýsingar, sum myndugleikin hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð í samband við virksemi myndugleikans, tá umbøn um innlit verður sett fram. Av hesum ávum hevur myndugleikin ikki skyldu at ganga einari umbøn um innlit á møti, ið snýr seg um at fáa innlit í ókomin skjøl og upplýsingar í einum máli. Myndugleikin hevur heldur ikki skyldu at framleiða nýggj skjøl ella upplýsingar.



3
km
2

# 9 Onnur viðgerð og hjálp til borgarar

Umboðsmaðurin hevur ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Ein klaga verður altíð kannað gjølla, áðrenn avgerð verður tikin, um hon skal avvísast. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ein avvísing av einari klagu kann vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Niðanfyri eru dømir um mál, har grundarlag ikki var fyri at gera meira við klaguna, tí gongd var komin á málið, málið var loyst undir klaguviðgerðini ella borgarin fekk hjálp á annan hátt.**

## MÁL NR 22/05142

Ein borgari sendi umboðsmanninum klagu um, at Umhvørvisstovan gjørdi ov lítið fyri at fáa eina kommunu at lata teimum neyðugu ummælini í tveimum matrikulmálum.

Umboðsmaðurin vendi sær bæði til Umhvørvisstovuna og viðkomandi kommunu um málið. Umhvørvisstovan greiddi frá, hvat var gjørt fyri at fáa kommununa at senda ummælini. Kommunan greiddi frá, at tað hevði drigið nakað út við at geva ummælið, men at nú var gongd komin á bæði málini, og ummælið var nú latið Umhvørvisstovuni í tí eina málinum, og hitt málið var sett á skrá til komandi kommunustýrisfund og kundi tí væntast at verða avgreitt um stutta tíð.

Grundað á, at Umhvørvisstovan í bíðitíðini hevði sent 2 áminningar til kommununa, og at gongd nú var komin á málini, metti umboðsmaðurin, at grundarlag var ikki fyri at gera meira við klaguna.

## MÁL NR 22/11406

Eini fosturforeldur klagaðu um vantandi umlætting til fosturbarn teirra, og at Almanna-verkið hevði sýtt teimum innlit í málið hjá fosturbarninum.

Eftir at hava fingið frágreiðing frá Almannaverkinum boðaði umboðsmaðurin klagarunum frá, at hann ikki helt grundarlag vera fyri at gera meira við klagu teirra.

Sambært skjølunum í málinum høvdu fosturforeldrini nú fingið eina avgerð frá

Almannaverkinum viðvíkjandi umlætting til fosturbarnið, og avgerðin kundi kærast til Føroya Kærustovn.

Viðvíkjandi sýtanini av innlitsumbønini greiddi Almannaverkið frá, at talan var um eina misskiljing, hvørji skjøl fosturforeldrini høvdu biðið um innlit í. Almannaverkið hevði tí viðgjørt innlitsumbønina av nýggjum og hevði játtað fosturforeldrunum innlit í viðkomandi skjøl.

Umboðsmaðurin boðaði klagarunum frá, at av tí at gongd var komin á málið, og fosturforeldrini høvdu fingið avgerð viðvíkjandi umsóknini um umlætting til fosturbarnið og avgerð viðvíkjandi innlitsumbønini, helt umboðsmaðurin seg ikki kunna hjálpa klagarunum meira við hesum málinum og gjørdi tí ikki meira við tað.

## MÁL NR 22/12239

Ein borgari, sum búði í einum raðhúsum, klagaði um, at Tórshavnar kommuna hevði givið grannum hansara byggiloyvi til umbygging, sum hevði við sær, at helvtin av trappuni, sum klagarin hevði felags við grannarnar, skuldi takast burtur. Tórshavnar kommuna hevði grannahoyrt klagaran og aðrar grannar í sambandi við byggiloyvi, tí umbyggingin broytti stílin í raðhúsabyggingini. Klagarin var ikki partshoyrdur um byggiloyvið til grannan.

Umboðsmaðurin bað Tórshavnar kommunu taka støðu til, um burturtøkan av helvtini av trappuni hevði við sær ítøkiligan og munandi ampa fyri klagaran, soleiðis at klagarin var persónliga, týðandi og rættarliga ávirkaður av byggimálinum hjá grannanum og tí, sambært fyrisitingarlógini, skuldi metast sum partur av byggimálinum hjá grannanum.

Tórshavnar kommuna sendi síðani borgaranum avgerð um, at niðurtøka av helvtini av trappuni ikki kom undir byggiloyvi, men undir felags garðskyldu. Avgerðin kundi kærast til Føroya Kærustovn.

Umboðsmaðurin boðaði síðani klagaranum frá, at av tí at klagarin nú hevði fingið møguleika at kæra málið til Føroya Kærustovn, helt hann seg ikki kunna hjálpa klagaranum meira við hesum málinum og gjørdi tí ikki meira við tað.

## MÁL NR 22/14527

Ein borgari klagaði til umboðsmannin um handfaringina hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum av hansara fyrispurningum um eitt bústaðarmál.

Eftir at umboðsmaðurin hevði sent klaguna til ummælis hjá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, boðaði klagarin frá, at klagan var tikin aftur. Orsøkin var tann, at klagarin eftirfylgjandi hevði verið á fundi við Umhvørvis- og vinnumálaráðið við tí úrsliti, at klagarin ikki longur metti, at grundarlag var fyri klagu hansara.

## MÁL NR 22/17042

Ein mamma klagaði um, at dóttir hennara ikki fekk endurrindað útreiðslur til ferðing við bussi millum heimið og miðnámsskúlan, har hon var næmingur. Dóttirin hevði umvegis miðnámsskúlan søkt um busskort. Busskortið var útskrivað hjá Strandfaraskipum Landsins, men lá ikki á skrivstovuni á miðnámsskúlanum, tá skúlin byrjaði. Strandfaraskip Landsins hevði tí útskrivað henni eitt nýtt kort, men áðrenn kortið kom fram, hevði hon sjálv rindað fyri ferðing í 10 dagar.

Sambært klagaranum vildu hvørki miðnámsskúlin ella Strandfaraskip Landsins endurrinda dóttrini ferðaútreiðslurnar fyri hesar 10 dagarnar.

Umboðsmaðurin setti seg í samband við Strandfaraskip Landsins, sum upplýsti, at umsókn um endurgjald saman við møguligum skjalprógvum kundi sendast til Strandfaraskip Landsins, sum so viðgjørdi málið.

Umboðsmaðurin kunnaði klagaran um hetta og boðaði samstundis frá, at hann ikki helt grundarlag vera fyri at gera meira við klaguna í løtuni, og hann tí ikki gjørdi meira við málið.



„Skyldan at seta tann best skikkaða er galdandi sum ein óskrivað fyrisitingarrættarlig meginregla, galdandi fyri starvssetan á almenna arbeiðsmarknaðinum.“



**Heini Petersen**, ráðgevi

# Starvssetan innan fyri tað almenna

Viðurskifti kring starvssetan innan almenna geiran, ið er land og kommunur, eru skipað í lóggávu, fyrisitingarrættarligum meginreglum, felagsavtalum á almenna arbeiðsmarknaðinum og í starvsfólkapolitikki.

Av lógum, ið skipa økið, kunnu m.a. nevnast, fyrisitingarlógin (løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg), tænastumannalógin (løgtingslóg nr. 31 frá 5. juli 1971 um tænastumenn landsins), javnstøðulógin (løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn) og løgtingslóg nr. 63 frá 26. juni 2011 um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki.

Harafturat eru viðurskifti kring starvssetan hjá landinum skipað í starvsfólkapolitikki landsins. Starvsfólkapolitikkurin er settur í verk av landsstýrinum og setur karmar fyri starvsfólkapolitikkinum, ið er galdandi í landsfyrisitingini. Partar av starvsfólkapolitikkinum mugu metast sum galdandi fyri allar almennar setanir og síggjast eitt nú aftur í lóggávu og ásetingum í felagsavtalum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Kommunurnar hava ikki ein felags starvsfólkapolitikk, men summar kommunur hava sett í gildi ein starvsfólkapolitikk/starvsfólkaskipan, ið m.a. viðger starvssetan.

Uttan mun til um kommunur hava sett í gildi ein starvsfólkapolitikk, so er ein kommuna í øllum førum bundin av viðkomandi lóggávu, fyrisitingarrættarligum meginreglum og galdandi felagsavtalum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Viðurskifti kring starvssetan eru eisini skipað í ávísum felagsavtalum á almenna arbeiðsmarknaðinum. Ein felagsavtala er ein semja millum arbeiðsgevarar og umboð fyri arbeiðstakarar, ið vanliga er eitt fakfelag, um hvørjar treytir og krøv skulu galda í mun til arbeiði. Innan tað almenna eru arbeiðsgevararnir í høvuðsheitum landið og kommunurnar, ið ávikavist eru umboðaði av Fíggjarmálaráðnum og Kommunala Arbeiðs-

gevarafelagnum. Galdandi felagsavtalur á almenna arbeiðsmarknaðinum eru m.a. at finna á heimasíðunum: fmr.fo og kaf.fo.

## Skyldan hjá setanarmyndugleikanum at seta tann best skikkaða

Á almenna arbeiðsmarknaðinum hava setanarmyndugleikar, við støði í kravinum um sakliga fyrisiting, skyldu at seta tann ella tey, sum úr einari heildarmeting eru best skikkað til starvið. Starvið eigur at verða lýst leyst í einari almannakunngjørdari starvslýsing, eitt nú í tíðindabløðum ella talgildum miðlum.

Skyldan at seta tann best skikkaða er galdandi sum ein óskrivað fyrisitingarrættarlig meginregla, galdandi fyri starvssetan á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Í ávísum felagssáttmálum er tó frávik gjørt frá kravinum um almannakunngjørda starvslýsing, t.d. tá talan er um fyribilssett starvsfólk, soleiðis, ið ásett er í felagsavtaluni millum Starvsfelagið og Fíggjarmálaráðið/Kommunala arbeiðsgevarafelagið og felagsavtaluni millum Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

## Krøv til starvslýsingina hjá setanarmyndugleikanum

Ongin lóggáva er, ið skipar innihaldið av starvslýsingum fyri størv, ið lýst verða leys á almenna arbeiðsmarknaðinum, við undantakið av tænastumannastørvum, ið nærri er greitt frá niðanfyri.

Í ávísum felagsavtalum, t.d. felagsavtalunum millum Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, Starvsfelagið og Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og felagsavtaluni millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, standa ymsar treytir fyri, hvat ein starvslýsing í minsta lagi skal innihalda. Sum dømi kann nevnast, at í felagsavtalunum millum Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið og Starvsfelagið og Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, stendur sum krav, at starvslýsingin skal tilskila, hvat starvið fevnir um, hvør útbúgving krevst og hvør lønin er.

Í starvsfólkapolitikki landsins og eitt nú í starvsfólkaskipanini hjá Vága- og Kvívíkar kommunu er ásett, at starvslýsingin skal hava eina umsóknarfreist, sum í minsta lagi er 14 dagar. Sama umsóknarfreist er t.d. ásett í felagsavtaluni millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið/Kommunala Arbeiðsgevarafelagið, men er ikki ásett í øllum felagsavtalum á almenna arbeiðsmarknaðinum.

Umsóknarfreistin eigur í øllum førum at verða rímilig, soleiðis at møguligir skikkaðir umsøkjarar fáa veruligar stundir at umráða og ráðføra seg og fyrireika eina nøktandi umsókn. Á tann hátt hevur setanarmyndugleikin gjørt sítt til í royndini at finna tann umsøkjaran, ið út frá eini heildarmeting er tann best skikkaði til starvið.

Innihaldið í starvslýsingini eigur eisini í minsta lagi at umboða tey krøv og treytir, ið vanliga mugu metast at verða viðkomandi fyri at røkja tað starvið, ið lýst er leyst.

Fyri tænastumannastørv eru viðurskiftini kring innihaldið av starvslýsingini serliga skipað í § 5, stk. 2 og 3 í tænastumannalógini, ið er soljóðandi:

> "**§ 5.**
> …
>
> *Stk. 2.* Í lýsingini skal starvsøkið, starvsheitið og tann fyri starvið í løtuni galdandi lønarramma og tað í løtuni galdandi tænastustað, tilskilast.
> *Stk. 3.* Umsóknarfreistin eigur ikki at vera styttri enn 14 dagar, uttan so at serlig viðurskifti gera tað fyri neyðini.
>
> …"

## Krøv til málsviðgerðina hjá setanarmyndugleikanum

***Starvssetan, ein fyrisitingarrættarlig avgerð***
Tá setanarmyndugleikin, t.d. ein stovnur, kommunustýri ella einstaki landsstýrismaðurin, tekur avgerð um at seta ein av umsøkjaranum í starv, er hetta at meta sum ein fyrisitingarrættarlig avgerð. Tað sama er galdandi, um setanarmyndugleikin velur at havna einari umsókn um starv.

Tað merkir, at avgerðin og setanartilgongdin eru fevnd av teimum skrivaðu og óskrivaðu reglum, ið galda í fyrisitingarrættinum.

Hesar reglur eru eitt nú reglurnar um partshoyring, grundgeving og kæruvegleiðing, ið ásettar eru í fyrisitingarlógini og óskrivaðu fyrisitingarrættarligu meginreglurnar, so sum meginreglan um sakliga fyrisiting, skyldan at lýsa eitt mál til fulnar (da. officialprincippet) og líkareglan.

***Meginreglan um sakliga fyrisiting***
Meginreglan um sakliga fyrisiting ber við sær, at ein fyrisitingarrættarlig avgerð skal verða grundað á saklig atlit. Ein setanarmyndugleiki eigur tískil einans at meta um viðurskifti, ið eru saklig í mun til at røkja ítøkiliga starvið, ið lýst er í starvslýsingini.

Yvirskipað setur t.d. Grundlógin og Evropiski Mannarættindasáttmálin mark fyri, hvat setanarmyndugleikin sakliga kann leggja dent á. Her verður serliga hugsað um felags-

frælsi og trúarfrælsi, ið ein setanarmyndugleiki skal geva sær far um í sambandi við tey atlit, ið myndugleikin ætlar at leggja dent á.

Av sakligum atlitum, ið ein setanarmyndugleiki kann leggja dent á, kann nevnast, at sambært § 9, stk. 1 í tænastumannalógini skal ein tænastumaður „*samvitskufult halda tær fyri starv hansara galdandi reglur, og skal bæði í og uttan fyri tænastu vísa slíkan atburð, sum starv hansara sømir*“. Hetta krav um sóma, ið nevnist dekorumreglan, má eisini metast at vera galdandi fyri umsøkjarar til størv, ið ikki eru tænastumannastørv. Um setanarmyndugleikin eitt nú veit av, at ein umsøkjari hevur framt revsiverd viðurskifti, kann setanarmyndugleikin, vísandi til dekorumregluna, meta um hesi viðurskifti kunnu væntast at gerast ein bági fyri umsøkjaran at røkja starvið. Í slíkum førum hevur tað týdning, hvussu gomul tey revsiverdu viðurskiftini eru.

Harafturat kann nevnast, at um setanarmyndugleikin er vorðin varugur við, at ein umsøkjari áður er koyrdur úr starvi vegna vantandi samstarvsevni, kann setanarmyndugleikin, um viðkomandi søkir starv aftur, sakliga leggja dent á hetta í sínari meting av, um umsøkjarin er skikkaður til starvið. Í hesum høpi eigur setanarmyndugleikin tó at tryggja sær, at málið er lýst til fulnar. Sí nærri niðanfyri í brotunum „skyldan at lýsa eitt mál til fulnar“ og „skyldan at partshoyra“.

At enda kann nevnast, at ein setanarmyndugleiki, sum meginregla, ikki kann leggja dent á, at umsøkjari hevur ávíst kyn í sambandi við starvssetan, smb. § 3 í løgtingslóg nr. 52 frá 3. mai 1994 um javnstøðu millum kvinnur og menn. Á sama hátt kann setanarmyndugleikin heldur ikki leggja dent á, at umsøkjari ikki skal bera ávíst brek – ella at umsøkjari skal bera ávíst brek, smb. §§ 2 og 3 í løgtingslóg nr. 63 frá 26. juni 2011 um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki.

### *Skyldan at lýsa eitt mál til fulnar*

Ein onnur meginregla er skyldan at lýsa eitt mál til fulnar. Hendan meginreglan setur krøv til setanartilgongdina, m.a. hvussu setanarsamrøðan verður løgd til rættis, eitt nú um neyðugt er við fleiri setanarsamrøðum, serfrøði ella útvegan av ummæli frá tilvísingar-persónum, ið umsøkjararnir hava víst til.

Avgerandi er, at setanarmyndugleikin lýsir øll viðurskifti, ið kunnu hugsast at verða viðkomandi fyri metingina av, hvør av umsøkjarunum er tann best skikkaði. Skyldan stuðlar sostatt undir, at myndugleikin tekur „røttu“ avgerðina.

Ein fakliga væl samansett setanarnevnd kann vera ein munagóður háttur hjá einum setanarmyndugleika at fáa eitt setanarmál lýst til fulnar og avgreitt samsvarandi teimum reglum, ið galdandi eru í fyrisitingarlógini og fyrisitingarrættinum sum heild.

Í máli LUM 20/00137 gav umboðsmaðurin Uttanríkis- og mentamálaráðnum eina átalu fyri handfaringina av málinum um setan av nýggjum stjóra fyri Tjóðpall Føroya. Umboðsmaðurin helt, at Uttanríkis- og mentamálaráðið ikki hevði útvegað sær allar neyðugu upplýsingarnar í málinum fyri at kunna staðfesta, at Leiklistaráðið hevði

tikið saklig atlit í sambandi við starvsetanina. Umboðsmaðurin helt tí, at Uttanríkis- og mentamálaráðið ikki hevði lýst málið nøktandi, áðrenn ráðið tók endaliga avgerð í málinum.

### *Skyldan at partshoyra*

Sum partur av skylduni at lýsa eitt mál til fulnar, kann setanarmyndugleikin, áðrenn ein avgerð verður tikin, hava skyldu at partshoyra ein ella fleiri av umsøkjarunum, smb. § 18, stk. 1 í fyrisitingarlógini. Hetta kann eitt nú verða, um setanarmyndugleikin, í sambandi við eina setanarsamrøðu, hevur fingið upplýsingar frá einum fyrrverandi arbeiðsgevara, ið ikki eru til fyrimunar fyri ein umsøkjara.

### *Skyldan at svara og viðgerðartíðin*

Sambært góðum fyrisitingarsiði skal setanarmyndugleikin geva øllum umsøkjarum eitt svar til teirra umsókn. Setanarmyndugleikin eigur eisini at skipa soleiðis fyri, at viðgerðin av umsóknunum ikki gerst óneyðuga drúgv. Um viðgerðin av umsóknunum gerst drúgvari enn vanligt, eigur setanarmyndugleikin at kunna umsøkjararnar um orsøkina til seinkanina, og nær tað kann væntast, at setanin verður avgreidd.

### *Skyldan at grundgeva*

Sambært § 21 í fyrisitingarlógini, skal ein avgerð, tá hon verður fráboðað skrivliga, hava eina grundgeving, uttan so, at avgerðin til fulnar gongur partinum á møti.

Grundgevingin skal verða givin samstundis, sum avgerðin verður fráboðað.
Tað er sum meginregla ikki krav sambært fyrisitingarlógini, at ein avgerð skal fráboðast skrivliga, men sambært § 22, stk. 1 í fyrisitingarlógini, kann hann, sum munnliga hevur fingið boð um eina avgerð, krevja at fáa skrivliga grundgeving fyri avgerðini.

Grundgevingin skal hjálpa umsøkjaranum betri at skilja avgerðina og góðtaka hana. Grundgevingin skal tryggja, at umsøkjarin hevur møguleika at kanna, um avgerðin er røtt, at grundarlagið fyri avgerðini er sakligt, og at málið var lýst til fulnar, áðrenn avgerðin varð tikin.

Ein havnað umsókn skal hava eina grundgeving samsvarandi krøvunum í § 23 í fyrisitingarlógini. Fyri teir umsøkjarar, ið ikki eru bodnir til setanarsamrøðu, er vanliga ikki neyðugt hjá setanarmyndugleikanum at grundgeva gjølliga fyri avgerðini. Dømi kann vera um, at setanarmyndugleikin longu frammanundan metir seg hava greiða og skjalfesta vitan um, at umsøkjarin ikki er skikkaður til starvið. Sí eisini niðanfyri undir brotinum „Meting av umsøkjarum“.
Hóast setanarmyndugleikin ikki nýtist at grundgeva gjølliga, eigur grundgevingin tó altíð í minsta lagi at vera soleiðis orðað, at umsøkjarin greitt sær, hvat setanarmyndugleikin hevur grundað sína avgerð á.

Er hinvegin talan um umsøkjarar, ið eru komnir longur í setanartilgongdini og hava verið til eina ella fleiri setanarsamrøður, ella til dømis beinleiðis eru tilmæltir at fáa starvið, eigur setanarmyndugleikin, um so er at umsøkjarin ikki fær starvið, at grundgeva gjølliga fyri

avgerðini. Grundgevast skal soleiðis, at umsøkjarin greitt sær hvørji atlit vóru avgerandi fyri, at annar umsøkjari fekk starvið, t.d. við at gera eina samanbering av umsøkjarunum, har útbúgving, royndir, setanarsamrøður o.a. verður samanborðið og greinað.

Í máli *LUM 21/23892* gav umboðsmaðurin Uttanríkis- og mentamálaráðnum eina átalu fyri ikki at geva klagaranum eina nøktandi grundgeving í sambandi við eitt setanarmál. Umboðsmaðurin helt, at tað, at klagarin ikki bara hevði verið til setanarsamrøðu, men eisini í tilmælinum frá setanarnevndini varð mettur at verða best skikkaði umsøkjari at røkja starvið sum skúlastjóri, setti enn strangari krøv til skylduna at grundgeva.

Í máli *LUM 16/00024* viðgjørdi umboðsmaðurin eina klagu um fyrisitingarligu viðgerðina hjá stýrinum fyri Økistænastuna í Sandoyar Sýslu um at seta leiðara fyri Økistænastuna. Umboðsmaðurin helt m.a. tað vera sera atfinningarsamt, at klagararnir onga skrivliga grundgeving høvdu fingið um, hví teir ikki fingu starvið. Umboðsmaðurin gav stýrinum fyri Økistænastuna í Sandoyar Sýslu eina álvarsliga átalu fyri málsviðgerðina.

## Setanartilgongdin hjá setanarmyndugleikanum

***Førleikin hjá setanarmyndugleikanum***

Tá setanarmyndugleikin skal meta um umsøkjararnar, er tað vanligt, at ein setanarnevnd verður sett at taka sær av setanartilgongdini og mæla til ein ella fleiri av umsøkjarunum til starvið. Ofta verður eitt slíkt tilmæli gjørt í talmerktari raðfesting, ið setanarmyndugleikan síðani kann taka støðu til.

Skipanin við setanarnevndum er ikki skipað í lóggávu ella felagsavtalum á almenna arbeiðsmarknaðinum, men er skipað í starvsfólkapolitikki landsins og starvsfólka-politikkinum/starvsfólkaskipanini hjá summum kommunum.

Avgerðin hjá einari setanarnevnd um tilnevning av einum umsøkjara er einans til-mælandi fyri setanarmyndugleikan, um ikki annað er ásett aðrastaðni, t.d. í lóggávu ella felagsavtalu.

Til tess at skyldan um at seta best skikkaða umsøkjaran kann vera hildin, eiga allir setanarmyndugleikar at útvega sær neyðugu førleikarnar, t.d. við at seta eina setanarnevnd ella fáa hjálp frá uttanhýsis serfrøði, soleiðis at setanarmyndugleikin altíð er „ílatin“ at velja tann umsøkjaran, ið út frá einum heildarmeting er tann best skikkaði til starvið.

***Tal av skikkaðum umsøkjarum***

Onki krav er í lóggávu ella felagsavtalum um, at setanarmyndugleikin skal søkja av nýggjum um ongir ella ov fáir skikkaðir umsøkjarar eru til eitt starv. Tænastumannastørv eru tó undantikin, ið lýst er niðanfyri.
Hóast hettar, so eigur setanarmyndugleikin, grundað á skylduna at seta best skikkaða umsøkjaran í starv, at gera sær eina meting av, um til ber at finna nóg skikkaðar umsøkjarar, millum teir, ið hava latið inn starvsumsókn, ella um neyðugt er søkja av nýggjum.

Fyri tænastumannastørv er kravið ásett í § 5, stk. 4 í tænastumannalógini, ið er soljóðandi:

> “**§ 5.**
>
> …
>
> *Stk. 4.* Heldur landsstýrið, at eingin av umsøkjarunum, ið søkt hava lýst starv innan ásettu tíðarfreist, er nóg væl skikkaður til starvið, ella at nýggj lýsing kann elva duguligari monnum at søkja, skal starvið verða lýst av nýggjum.“

***Meting av umsøkjarum***

Setanartilgongdin verður vanliga løgd soleiðis til rættis, at nakrir av umsøkjarunum beinanvegin verða sáldaðir frá, og nakrir bodnir til eina ella fleiri setanarsamrøður.

Í nógvum førum er talan um ein lutfalsligan stóran hóp av umsøkjarum, ið setanarmyndugleikin skal taka støðu til. Tá setanarmyndugleikin skal meta um, hvørjir av hesum umsøkjarum skulu bjóðast til eina setanarsamrøðu, er neyðugt, at setanarmyndugleikin hevur gjørt sær eitt sakligt metingarstøði, grundað á starvslýsingina, til at fremja úrvalið.

Í ávísum førum verða umsøkjarar, ið á pappírinum eru skikkaðir sum evni til eina setanarsamrøðu, sáldaðir frá. Talan kann t.d. verða um, at setanarmyndugleikin longu frammanundan metir seg hava greiða og skjalfesta vitan um, at ein av umsøkjarunum ikki er skikkaður til starvið. Í slíkum føri skal setanarmyndugleikin tó verða varin við at leggja viðurskifti til grund fyri sínari støðutakan, ið eru hend fyri fleiri árum síðani. Avgerandi er í øllum førum, at setanarmyndugleikin hevur gjørt sær greitt, um málið er lýst til fulnar, um partshoyring krevst og at viðkomandi umsøkjari í slíkum førum fær eina gjølliga grundgeving. Sí nærri omanfyri í brotunum „skyldan at grundgeva“, „skyldan at lýsa eitt mál til fulnar“ og „skyldan at partshoyra“.

Tá setanarsamrøðurnar verða hildnar, er tað umráðandi at fyrisitingarrættarliga líkareglan verður hildin. Tað vil eitt nú siga, at spurnabløð og aðrar kanningar eru gjørdar eftir sama leisti fyri allar umsøkjararnar.

Metingin skal taka støði í teimum krøvum og treytum, ið settar eru í starvslýsingini, og skal altíð og einans vera grundað á saklig atlit. Sí omanfyri undir brotinum „Meginreglan um sakliga fyrisiting“.

Vanliga eru starvslýsingarnar orðaðar soleiðis, at summi viðurskifti, so sum útbúgving, aldur, koyrikort o.a., skulu vera lokin av øllum umsøkjarum. Onnur viðurskifti, so sum persónligir eginleikar, royndir o.a., eru ofta orðaði soleiðis, at setanarmyndugleikin kann gera sær eina meting og samanbering av hesum, grundað á ta vitan og upplýsingar, ið setanarmyndugleikin fær útvega sær í setanartilgongdini. T.d. kann ein umsøkjari skara burturúr við viðkomandi royndum í starvslýsingini, men í setanarsamrøðuni avdúka vantandi persónligar eginleikar at røkja starvið.

### *Val av umsøkjara*

Tá setanarmyndugleikin hevur tikið avgerð um at seta ein av umsøkjarunum í starv, er mannagongdin vanliga tann, at umsøkjarin fær eitt tilboð frá setanarmynduglekanum um starvssetan, ið hann skjótast gjørligt skal taka støðu til.

Sambært løgtingslóg nr. 20 frá 8. mai 2008 um skyldu arbeiðsgevarans at fráboða løntakaranum treytirnar fyri setanarviðurskiftunum, hevur setanarmyndugleikin skyldu at geva tí setta eitt setanarbræv, har upplýst m.a. verður um, nær setanin byrjar, arbeiðstíðina um vikuna, lønarviðurskifti, og hvørjar felagsavtalur á almenna arbeiðsmarknaðinum skipa arbeiðsviðurskiftini.



# 11 Skjøl

## Skjal 1

**Løgtingslóg nr. 60 frá 10. mai 2000 um Løgtingsins umboðsmann**

**1. Partur**

**Umboðsmaðurin og Løgtingið**
**§ 1**. Løgtingið velur ein uttantingsmann fyri eitt 5 ára skeið at hava innlit við fyrisiting heimastýrisins.
*2. stk*. Doyr umboðsmaðurin í embætistíð síni ella er hann av øðrum orsøkum ikki førur fyri at røkja starv sítt, ger formansskapur Løgtingsins av, hvør skal røkja starvið, til Løgtingið velur ein nýggjan umboðsmann. Tað sama er galdandi, um umboðsmaðurin biður um at verða loystur úr starvi, ella um Løgtingið loysir hann úr starvi smb. stk. 3.
*3. stk*. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum, kunnu tveir triðingar av løgtingsmonnunum loysa hendan úr starvi.

**§ 2**. Umboðsmaðurin, ið ikki kann sita á Løgtingi ella í kommunustýri, skal so vítt gjørligt hava løgfrøðiliga útbúgving.

**§ 3**. Við løgtingslóg kunnu verða gjørdar almennar reglur fyri virksemi umboðsmansins. Annars er umboðsmaðurin í starvi sínum óheftur av Løgtinginum.

**2. Partur**

**Heimildir**
**§ 4**. Virksemið umboðsmansins fevnir um alla fyrisiting heimastýrisins (t.e. lands- og kommunalu), og viðurskifti hjá børnum á privatum stovnum v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum.
*2. stk*. Lógin er eisini galdandi fyri feløg, stovnar, felagsskapir v.m., ið verða roknað við til almennu fyrisitingina sambært fyrisitingarlógini, lógini um alment innlit ella lógini um viðgerð av persónsupplýsingum.
*3. stk*. Í meting sínari av kommunalari umsiting skal umboðsmaðurin vísa atlit til tær serligu umstøður, kommunufyrisiting virkar undir.
*4. stk*. Interkommunalir felagsskapir eru undirlagdir virksemi umboðsmansins.
*5. stk*. Virksemi umboðsmansins fevnir ikki um ríkismyndugleikar, Løgtingið og stovnar undir Løgtinginum.

**§ 5**. Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at tær í § 4 nevndu umsitingareindir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

## 3. Partur

**Kærumál og egin mál**

**§ 6**. Ein og hvør kann senda umboðsmanninum klagu um tær í § 4 nevndu umsitingareindir.
*2. stk.* Tann, ið klagar, skal navngeva seg í klaguni. Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.
*3. stk.* Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum. Freistin, ið er nevnd í 2. stk., skal í slíkum førum roknast frá tí degi, hægri myndugleikin tekur avgerð sína.
*4. stk.* Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.
*5. stk.*Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar og fremja neyðugar kanningar í hesum sambandi.
*6. stk.* Umboðsmaðurin kann kanna viðgerðina hjá myndugleikunum av útvaldum málum.
*7. stk.* Umboðsmaðurin kann kanna allar stovnar, myndugleikar og tænastustøð, sum eru fevnd av virkisøkinum hjá umboðsmanninum.

## 4. Partur

**Kanningar**

**§ 7.** Ger umboðsmaðurin av at taka eina klagu til viðgerðar, skal hann beinanvegin kunna viðkomandi umsiting um innihaldið í klaguni, um ikki vandi er fyri, at hetta kann darva kanningini. Harumframt skal umsitingin biðjast um ummæli í málinum, áðrenn umboðsmaðurin tekur avgerð um at gera vart við meting sína av málinum smb. § 10, stk. 2. Umboðsmaðurin kann áseta tíðarfreist til ummæli.

**§ 8.** Tær í § 4 nevndu umsitingar hava skyldu at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt.
*2. stk.* Umboðsmaðurin kann stevna fólki í rættin at vitna um viðurskifti, ið eru avgerandi í kanningararbeiðinum. Í slíkum førum eru reglurnar í rættargangslógini galdandi. Rættarfundirnir eru ikki almennir. Tann, ið klagan viðvíkur, hevur saman við hjáseta rætt at vera hjástaddur, meðan slík vitnisførsla fer fram.
*3. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til at vitja støð, ið kannað verða, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.
*4. stk.* Metir umboðsmaðurin tað vera neyðugt, kann hann uttan rættarúrskurð kanna privatar stovnar v.m., hvørs uppgávur beinleiðis viðvíkja børnum, sbrt. § 4, stk. 1.

**§ 9.** Umboðsmaðurin hevur tagnarskyldu um tey viðurskifti, hann í virksemi sínum fær kunnleika til. Tagnarskyldan stendur við, eftir at umboðsmaðurin fer úr starvi, og fevnir eisini um starvsfólk á umboðsmansstovninum.

## 5. Partur

**Niðurstøður**
**§ 10.** Kemur umboðsmaðurin til ta niðurstøðu, at álvarsligt mistak ella vansketni er framt av einum av teimum í § 4 nevndu umsitingum, skal umboðsmaðurin boða formansskapi Løgtingsins, løgmanni og viðkomandi landsstýrismanni og /ella kommunustýri frá hesum og koma við tilmæli til teirra.
*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur rætt til alment at finnast at, koma við tilmælum, og á annan hátt gera vart við meting sína av máli, hann hevur kannað.
*3. stk.* Umboðsmaðurin kann mæla viðkomandi myndugleikum til, at fríur rættargangur verður givin, smb. rættargangslógini §§ 330 –336c, í málum, sum hava verið viðgjørd eftir hesi lóg.

**§ 11.** Umboðsmaðurin letur Løgtinginum ársfrágreiðing um arbeiðið sítt. Frágreiðingin verður almannakunngjørd áðrenn 1. juli.
*2. stk.* Boðar umboðsmaðurin Løgtinginum, landstýrismanni ella kommunustýri frá einum máli, ella tekur hann eitt mál við í ársfrágreiðing sína, skal hann upplýsa um, hvat viðkomandi hevur ført fram til verju sína.

**§ 12.** Rakar umboðsmaðurin við lýti í galdandi lógum, fyriskipanum ella umsitingarligum avgerðum, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um viðurskifti, ið viðvíkja kommunalari ella interkommunalari umsiting, skal umboðsmaðurin eisini boða viðkomandi kommunustýri frá.
*2. stk.* Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, um galdandi lógir og fyrisitingarligar ásetingar eru sambæriligar við altjóða skyldur at tryggja barnarættindi, herundir sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá børnum. Rakar umboðsmaðurin við lýti í hesum sambandi, skal umboðsmaðurin boða Løgtingi og viðkomandi landsstýrismanni frá hesum. Er talan um lýti í ásetingum, ásettar av eini kommunu, skal umboðsmaðurin boða viðkomandi kommunustýri frá.

**§ 13.** Um umboðsmaðurin krevur tað, kunnu dómstólarnir vísa frá sær privatmál móti umboðsmanninum vegna avgerðir, sum hann tekur við grundarlagið í hesi lóg.

## 6. Partur

**Lønar- og eftirlønarviðurskifti**
**§ 14.** Lønarviðurskifti umboðsmansins, herundir eisini spurningin um eftirløn og bíðipening, verða ásett við løgtingslóg.
*2. stk.* Umboðsmaðurin kann ikki, uttan við loyvi Løgtingsins, vera í starvi hjá almennum ella privatum fyritøkum, virkjum ella stovnum.
*3. stk.* Møguligur spurningur um ógegni umboðsmansins í ávísari søk verður lagdur fyri formansskap Løgtingsins, sum, um mett verður, at talan er um ógegnið, útnevnir annan at viðgera hetta ávísa mál.

**§ 15.** Umboðsmaðurin kann krevja at verða loystur úr starvi við seks mánaða freist at galda frá seinasta degi í einum mánaði.

## 7. Partur

**Fyrisiting**
**§ 16.** Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

**§ 17.** Tær útreiðslur, ið standast av umboðsmansstovninum, verða játtaðar á Løgtingsins fíggjarlóg.
*2. stk.* Umboðsmaðurin ger roknskap fyri virksemi stovnsins, hesin skal vera grannskoðaður av grannskoðara Løgtingsins.

## 8. Partur

**Ígildisreglur**
**§ 18**. Henda lóg kemur í gildi 1. januar ár 2001.
*2. stk.* Klagur um viðurskifti í tíðarskeiðinum 1. januar 2000 og til henda lóg kemur í gildi, kunnu kortini leggjast fyri umboðsmannin til viðgerðar.

# Skjal 2

***Vegleiðingin um Løgtingsins umboðsmann***

**Hvønn og hvat kunnu tygum klaga um**
Umboðsmaðurin hevur eftirlit við allari fyrisitingini undir heimastýrinum, tvs. bæði lands-, kommunalu og interkommunalu myndugleikunum.

Umboðsmaðurin kann viðgera klagur um avgerðir hjá myndugleikunum, eins og viðferð teirra av borgarum og málum.

Tygum kunnu t.d. klaga um eina noktan av einari umsókn, um tann valda viðgerðarháttin, um ta tíðina, sum hetta hevur tikið og / ella framferðarháttin hjá embætisfólkunum.

Umboðsmaðurin hevur eftirlit við, at myndugleikarnir ikki gera mistøk ella vanrøkja skyldur sínar, og at almenna umsitingin ikki fremur órætt móti einstaka borgaranum.

Dómstólarnir, Løgtingið, feløg og privatir persónar eru ikki almennir fyrisitingar-myndugleikar. Tí kann umboðsmaðurin ikki viðgera klagur um hesi. Donsku myndug-leikarnir, sum t.d. løgreglan, hoyra ikki undir heimastýrið. Tí kann umboðsmaðurin heldur ikki viðgera klagur um hesar. Um tygum eru í iva um, hvørt tygum kunnu klaga til umboðsmannin um ein ávísan myndugleika, kunnu tygum altíð spyrja okkum.

**Hvussu kunnu tygum klaga**
Um tygum ynskja at klaga, skulu tygum skriva til umboðsmannin og greiða frá, *hvønn* og *hvat* tygum ynskja at klaga um. Um tygum hava latið onkran annan klaga tygara vegna, skulu tygum leggja eina undirskrivaða fulltrú við klaguni. Tað lættir um máls-viðgerðina, um tygum senda møgulig viðkomandi skjøl (brøv frá tygum, svar frá myndug-leikunum o.s.fr.) saman við klaguni. Á hendan hátt fáa tygum eisini ofta skjótari svar, tí umboðsmaðurin vanliga hevur tørv á at síggja hesi skjøl.

**Hvat kann umboðsmaðurin gera**
Um umboðsmaðurin eftir at hava kannað málið kemur til ta niðurstøðu, at hann gevur viðkomandi viðhald, kann hann finnast at tí myndugleikanum, sum klagan snýr seg um. Umboðsmaðurin kann eisini heita á myndugleikan um at umhugsa málið av nýggjum og taka eina aðra avgerð. Leggið til merkis, at umboðsmaðurin ikki sjálvur kann broyta eina avgerð. Uppgávan hjá umboðsmanninum er sostatt at greiða myndugleikanum frá, at hesin eftir hansara fatan hevur gjørt eitt mistak.

Í hesum sambandi skulu tygum hava í huga, at umboðsmaðurin hevur avmarkaðar møgu-leikar fyri at taka støðu til avgerðir, ið eru grundaðar á reinar metingar ella avgerðir, har tað krevst ein serligur førleiki (t.d. læknaligur).

## Hvat hendir, tá umboðsmaðurin fær eina klagu

Umboðsmaðurin hevur 3 møguleikar at svara eini klagu:

*1)* Klagan verður kannað nærri.
*2)* Klagan verður avvíst, tí at umboðsmaðurin ikki kann viðgera hana.
*3)* Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.

### *1. Klagan verður kannað nærri.*

Heldur umboðsmaðurin, at ein klaga skal kannast nærri, sendir hann hana til viðkomandi myndugleika og biður um eina viðmerking. Samstundis biður hann eisini um at læna møgulig skjøl í málinum. Viðmerkingin frá myndugleikanum verður vanliga send viðkomandi, sum fær møguleika at gera sínar viðmerkingar.

Hann, ið hevur klagað, verður vanliga kunnaður um gongdina í málinum.

Tá myndugleikin og viðkomandi hava gjørt sínar viðmerkingar til málið, er hetta vanliga klárt til endaligu niðurstøðu umboðsmansins. Alt eftir, hvussu nógv mál eru til viðgerðar hjá umboðsmanninum samstundis, og hvussu skjótt myndugleikarnir svara umboðsmanninum, mugu tygum rokna við, at tað kann ganga umleið eitt hálvt ár, áðrenn málið er liðugt viðgjørt.

### *2. Klagan verður avvíst.*

Løgtingið hevur í umboðsmanslógini (lóg nr. 60 frá 10. mai 2000) sett mark fyri, nær umboðsmaðurin kann viðgera eina klagu:

*„Klaga um avgerðir, ið møguligur hægri umsitingarmyndugleiki kann broyta, kann ikki sendast umboðsmanninum, fyrr enn viðkomandi hægri myndugleiki hevur tikið avgerð í málinum … “ (§ 6, stk. 3)*

Um tað er møguligt at kæra eina avgerð til ein annan fyrisitingarmyndugleika, skal hetta sostatt verða roynt, áðrenn umboðsmaðurin kann viðgera málið. Avgerðir, sum verða fráboðaðar skrivliga, skulu geva eina vegleiðing um møguligar kærumøguleikar, áðrenn farast kann til umboðsmannin. Eru tygum í iva, kunnu tygum venda tygum til myndugleikan, sum hevur tikið avgerðina, ella møguliga til skrivstovuna hjá umboðsmanninum.

*“ … Klagan skal vera umboðsmanninum í hendi í seinasta lagi eitt ár eftir, at tey viðurskifti, ið klagað verður um, áttu sær stað.“ (§ 6, stk. 2)*

Orðingin „viðurskifti“ fevnir um alt, sum klagast kann um til umboðsmannin, t.d. viðgerðina av einum máli, málsviðgerðartíðina, avgerðina í málinum, atburðin o.s.fr. Klaga tygum um eina avgerð, skal hendan sostatt verða tikin innanfyri tað seinasta árið.

Inniheldur klagan til umboðsmannin viðurskifti, sum myndugleikin ikki áður hevur tikið støðu til, sendir umboðsmaðurin næstan altíð klaguna víðari til myndugleikan og biður hendan taka støðu til hesi viðurskiftini. Samstundis verður viðkomandi kunnaður um hetta, og biðin um at bíða við at klaga til umboðsmannin, til myndugleikin hevur tikið støðu í málinum. Kemur eingin nýggj klaga, ger umboðsmaðurin ikki meira við málið.

***3. Umboðsmaðurin velur ikki at kanna málið.***
Í umboðsmanslógini stendur:

*„Umboðsmaðurin tekur støðu til, um grundarlag er fyri víðari kanningum í máli, ið klagað verður um.“ (§ 6, stk. 4)*

Umboðsmaðurin hevur sostatt ikki skyldu til at taka allar klagur upp til viðgerðar. Hann kann nokta at viðgera klaguna sum heild ella bert at viðgera ávís viðurskifti í hesari.

Umboðsmaðurin kannar altíð eina klagu gjølla, áðrenn hann tekur avgerð um at avvísa hana. Í tílíkum metingum verður vanliga hugt at, um tað eru útlit fyri, at umboðsmaðurin kann hjálpa viðkomandi.

Ofta skrivar ella ringir umboðsmaðurin til viðkomandi ella til myndugleikan, fyri at hava eitt trygt grundarlag fyri avgerð síni. T.d. kann hann biðja um skjølini í málinum.

Ein avvísing av at viðgera eina klagu kann sostatt vera úrslitið av einari víðfevndari málsviðgerð hjá umboðsmanninum.

**Umboðsmaðurin kann sjálvur taka eitt mál til viðgerðar**
Umboðsmaðurin kann eisini kanna eitt mál, uttan at tað finst nøkur klaga hesum viðvíkjandi. Umrøða í fjølmiðlunum kann t.d. hava við sær, at umboðsmaðurin gerst varur við eitt mál, sum hann ynskir at kanna nærri. Onkuntíð kunnu klagur vera orsøk til, at umboðsmaðurin fer at kanna viðurskifti, sum tað ikki er klagað um.

Umboðsmaðurin kann sambært §§ 6, stk. 5 og 8, stk. 3 kanna stovnar og tænastustøð v.m., ið hoyra til virkisøki hansara.

**Um umboðsmannin og embætið**
Løgtingið velur fimta hvørt ár ein Løgtingsins umboðsmann. Hevur Løgtingið ikki longur álit á umboðsmanninum kunnu 2/3 av limunum loysa hann úr starvi.

Umboðsmaðurin setir og loysir úr starvi starvsfólk síni.

Tygum kunnu ringja á tlf. 35 85 00, skriva teldupost til **lum@lum.fo** ella venda tygum til skrivstovuna undir Bryggjubakka 11, Tórshavn, um tygum hava spurningar.

# Skjal 3

**Yvirlit yvir endaliga viðgjørdar klagur og kanningar í 2022, har álit og skriv vóru almannakunngjørd**

Málini kunnu lesast á **www.lum.fo**

| Dagfesting | Málsnr. | Heiti á málinum á heimasíðuni |
|---|---|---|
| 09-02-2022 | 21/14528 | Skriv til Fuglafjarðar kommunu viðvíkjandi klagu um vantandi eftirlit við byggiloyvi og handfaring av einum máli |
| 11-02-2022 | 21/07682 | Kanning av fyrisitingarligu viðgerðini av matrikkulmálum |
| 23-02-2022 | 22/00137 | Álit viðvíkjandi sýtan av innliti í skjal við talupunktum hjá landsstýrismanninum í fiskivinnumálum |
| 03-03-2022 | 21/16374 | Skriv um tvey setanarmál og eitt uppsagnarmál hjá Vágs kommunu |
| 04-03-2022 | 21/01550 | Kanning av skúlagongd hjá umsorganaryvirtiknum barni |
| 19-05-2022 | 21/19719 | Kanning av næmingaráðum í fólkaskúlum, frískúlum og serskúla |
| 05-07-2022 | 21/23892 | Álit viðvíkjandi klagu um málsviðgerðina hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum í sambandi við setan av skúlastjóra í Vestmanna skúla |
| 26-09-2022 | 22/08550 | Álit viðvíkjandi klagu um vantandi svar frá Runavíkar kommunu í sambandi við umsókn um byggiloyvi til neyst og kanning av málsviðgerðini av umsóknum um byggiloyvi til neyst |
| 02-11-2022 | 22/03832 | Eftirlitsvitjan á sambýlum hjá Almannaverkinum |
| 19-12-2022 | 22/17836 | Álit um vantandi svar frá Landsverki í sambandi við fyrispurning |
| 27-12-2022 | 22/17872 | Álit um handfaringina hjá VEKS av eini umsókn um búpláss á røktarheimi |
| 04-01-2023 | 22/16132 | Álit um vantandi ansing á dagstovni av barni, sum ber brek |

LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR, UNDIR BRYGGJUBAKKA 11, POSTMOGA 2008, FO-110 TÓRSHAVN